| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**30. apríl 2009** | Blað nr.:<br>**7841**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **30. apríl 2009** **kl. 16.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 72/09-95/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Levi Mørk
Maria Hammer Olsen
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Jákup E. Hansen
Ingibjørg Berg

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**74/09** **<u>2009-0387</u>**

**<u>Mál beind í nevndir</u>**

**Býráðið 30. apríl 2009:** Tikið til eftirtektar.

**75/09** **<u>2008-3983/18 SG</u>**

**<u>Uppskot til ársfíggjarætlan 2009 hjá Tórshavnar kommunu</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býráðið hevur 11. september 2008, sambært kommunustýrisskipanini, framlagt karm til ársfíggjarætlan fyri 2009, ið javnvigar við tkr. 617.692.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2009, við støði í samtyktunum hjá faknevndunum, og javnvigar uppskotið nú við 1. viðgerð við tkr. 656.892. Munurin tkr. 39.200 kemst av framfluttum íløgum.

**<u>1. viðgerð</u>:**

**<u>Útreiðslur</u>:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Konto 01 | Miðfyrisitingin | kr. | 24.226 |
| - 02 | Trivnaðarfyrisitingin | - | 9.172 |
| - 03 | Tekniska fyrisitingin | - | 19.648 |
| - 04 | Kt-deildin | - | 6.077 |
| | **Fyrisiting íalt** | **kr.** | **59.123** |
| | | | |
| Konto11 | Vegir, gøtur, kloakkir o.a. | kr. | 18.273 |
| - 12 | Umhvørvismál | - | 1.600 |
| - 14 | Vatnveiting og gøtuljós | - | 13547 |
| - 15 | Renovatión | - | 19.238 |
| - 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | - | 19.300 |
| - 18 | Bussleiðin | - | 19.341 |
| - 19 | Sløkkiliðið/verkstaðið | - | 10.152 |
| - 38 | Fríðkan av býnum og kirkjugarðar | - | 12.199 |
| | **Tekniska veitingar íalt** | **kr.** | **113.650** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 20 | Skúlin í Hesti | kr. | 50 |
| | 21 | Nólsoyar skúli | - | 560 |
| | 22 | Velbastaðar skúli | - | 844 |
| | 23 | Kaldbaks skúli | - | 416 |
| | 24 | Kollafjarðar skúli | - | 2.678 |
| - | 241 | Ítróttarhøllin í Kollafirði | - | 500 |
| - | 25 | Tórshavnar kommunuskúli | - | 4.527 |
| - | 26 | Venjingarskúlin | - | 4.085 |
| - | 27 | Eysturskúlin | - | 4.396 |
| - | 28 | Sankta Frans skúli | - | 3.316 |
| - | 29 | Hoyvíkar skúli | - | 3.463 |
| - | 291 | Hoyvíkshøllin | - | 475 |
| - | 30 | Argja skúli | - | 3.612 |
| - | 31 | Kvøld-, ungdóms- og listaskúli | - | 4.128 |
| | 310 | Skúlin við Løgmannabreyt | - | 2.682 |
| - | 32 | Tórshavnar musikkskúli | - | 6.825 |
| - | 33 | Felags skúlamál | - | 4.457 |
| | | **Skúlamál íalt** | **kr.** | **47.014** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 34 | Tórshavnar býarsavn | kr. | 601 |
| - | 35 | Býarbókasavnið | - | 6.839 |
| - | 36 | Svimjihøllin | - | 5.743 |
| - | 37 | Stadion | - | 4.051 |
| - | 39 | Ymsir studningar | - | 11.860 |
| - | 64 | Stuðul til feløg o.o. | - | 3.022 |
| | | **Mentan og frítíð íalt** | **kr.** | **32.116** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| konto | 40 | Barnavernd - eldrarøkt o.a. | kr. | 19.457 |
| - | 41 | Lækna- og heilsumál | - | 4.510 |
| - | 411 | Serflutningsskipanin | - | 395 |
| - | 42 | Tannlæknastovan | - | 10.300 |
| - | 43 | Ellis- og umlættingarheimið | - | 0 |
| - | 431 | Sambýlið í Hoydølum | - | 670 |
| - | 432 | Tjarnargarður | - | 0 |
| - | 433 | Heimið í Vallalíð | | 0 |
| - | 434 | Sambýlið í Kollafirði | - | 590 |
| - | 435 | Sambýlið í Mattalág | - | 670 |
| - | 44 | Tilhaldið í Tórsgøtu | - | 0 |
| - | 441 | Dagtilhaldið í Nólsoy | - | 0 |
| | | **Almanna og heilsumál íalt** | **kr.** | **36.592** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| konto | 45 | Kommunala dagrøktin | kr. | 6.310 |
| - | 46 | Miðstovnurin í Gundadali | - | 1.760 |
| - | 47 | Dagstovnurin Lítliskógur | - | 5.062 |
| - | 48 | Býlingshúsið á Norðasta Horni | - | 2.531 |
| - | 49 | Býlingshúsið á Ternuryggi | - | 2.578 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| - | 50 | Býlingshúsið undir Fjalli | - | 2.721 |
| - | 51 | Býlingshúsið millum Gilja | - | 2.702 |
| - | 52 | Býlingshúsið undir Brúnni | - | 2.626 |
| - | 53 | Býlingshúsið Vesturi á Flat | - | 2.816 |
| - | 54 | Býlingshúsið Inni á Gøtu | - | 2.911 |
| - | 560 | Dagstovnurin í Hoyvík | - | 4.757 |
| - | 561 | Dagstovnurin við Løgmannabreyt | - | 3.539 |
| - | 562 | Dagstovnurin Millum Bóla | - | 1.808 |
| - | 563 | Dagstovnurin við Landavegin | - | 3.977 |
| - | 564 | Stella Maris vøggustova | - | 3.197 |
| - | 565 | Dagstovnurin Sólareygað | - | 4.243 |
| - | 566 | Dagstovnurin í Løkjutúni | - | 3.826 |
| - | 567 | Barnagarðurin við Velbastaðvegin | - | 6.546 |
| - | 568 | Barnagarðurin á Velbastað | - | 3.289 |
| - | 569 | Dagstovnurin Látrið | - | 1.231 |
| - | 572 | FTS í Hornabø | - | 1.653 |
| - | 573 | FTS Smílibýlið | - | 1.378 |
| - | 574 | FTS Blóma | - | 2.287 |
| - | 575 | FTS í Badmintonhøllini | - | 1.763 |
| - | 579 | FTS í Hoyvík | - | 1.984 |
| - | 58 | Dagstovnurin í Øksnagerði | - | 3.292 |
| - | 582 | Dagstovnurin Birkilund | - | 6.137 |
| - | 583 | Dagstovnurin Flatnagarður | - | 1.214 |
| - | 584 | Býlingshúsið í Maritugøtu | - | 2.578 |
| - | 585 | Dagstovnurin Kurl@ | - | 1.931 |
| - | 587 | Dagstovnurin við Botnánna | - | 1.490 |
| - | 589 | Dagstovnurin á Hamrinum | - | 3.730 |
| - | 588 | Margarinfabrikkin | - | 2.581 |
| - | 59 | Sjálvsognarstovnar o.a. | - | 14.348 |
| | 599 | Barna- og ungdómsdeildin | - | 24.170 |
| | | **Barnaansing íalt** | **kr.** | **138.966** |
| | | | | |
| Konto | 60 | Ymsar aðrar útreiðslur | kr. | 11.210 |
| - | 82 | Umsiting av bygningum | - | 42.335 |
| | 63 | Útveganir | - | 5.000 |
| | 68 | Útskiftan av amboðum | - | 7.000 |
| | 69 | Nýútvegan av amboðum | - | 3.000 |
| | | **Aðrar útreiðslur íalt** | **kr.** | **68.545** |
| | | | | |
| **Konto** | **66** | **Reguleringskonto** | **kr.** | **2.500** |
| | | **Rakstrarútreiðslur íalt** | **kr.** | **498.506** |
| | | | | |
| Konto | 90 | Íløgur | kr. | 145.200 |
| | Smábátahavn | | - | 4.000 |
| | | **Rakstur og íløgur íalt** | **kr.** | **647.706** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 61 | Rentuútreiðslur | kr. | 7.236 |
| - | 62 | Avdráttir av lánum | - | 1.950 |
| | **Lánsgjøld** | | **kr.** | **9.186** |
| | | **Útreiðslur íalt** | **kr.** | **656.892** |

**Inntøkur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 80 | Rentuinntøkur | kr. | 3.000 |
| - | 83 | Inntøkur av traðum og økjum | - | 3.000 |
| - | 85 | Aðrar inntøkur og útreiðslur | - | 0 |
| - | 89 | Skattainntøka | - | 598.796 |
| | At fíggja v. tøkum/framfluttur peningi | | - | 52.096 |
| | **Inntøkur íalt** | | **kr.** | **656.892** |

**Íløgur:**

| | | |
|---|---|---|
| Glyvursvegur 1-4. stig | kr. | 5.000 |
| Kloakkir | - | 10.000 |
| Renovatión | - | 2.200 |
| Kirkjugarðar | - | 2.000 |
| Fríðkan av býnum | - | 2.500 |
| Ítróttur og frítíðarvirksemi | - | 29.500 |
| Barnaansing | - | 2.000 |
| Skúlar og mentan | - | 87.000 |
| Eldraøkið | - | 5.000 |
| Smábátahavnir | - | 4.000 |
| **Tilsamans** | **kr.** | **149.200** |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. oktober 2008:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Leivur Hansen samtyktu at taka undir við uppskotinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jan Christiansen og Sjúrður Olsen taka støðu seinni.

Byggi- og býarskipanarnevndin umsitur konto 38 og 82.

**Sosiala nevnd 2. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við uppskotinum.

Sosiala nevnd umsitur konto 40, 41, 411, 42, 43, 431, 432, 433, 434, 435, 44 og 441.

**Brunanevndin 2. oktober 2008:** Samtykt at fíggjarætlanin verður kr. 10.152 mió.

Málið fer í fíggjarnevndina.

Konto 68 Útskiftan av amboðum – vísir nevndin á, at kommunan eigur amboð o.a. fyri kr. 100 mió. og tí verður mælt til at seta meira enn 6 mió. av í 2009.

Brunanevndin umsitur konto 19 og viðmælur konto 68, sum fíggjarnevndin umsitur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 2. oktober 2008:** Ein minniluti, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal, samtykti at beina málið í fíggjarnevndina við eini samlaðari upphædd til veitingar innan umhvørvi áljóðandi tkr. 20.838. Ein annar minniluti, Jan Christiansen og Beate L. Samuelsen tekur støðu á einum seinni fundi.

Heilsu- og umhvørvisnevndin umsitur konto 12 og 15.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2008:** Ein meiriluti, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Halla Samuelsen, mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við uppskotinum.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen og Inga Dahl, taka støðu á býráðsfundi.

Mentamálanevndin umsitur konto 20, 21, 22, 23, 24, 241, 25, 26, 27, 28, 29, 291, 30, 31, 310, 32, 33, 34, 35, 36, 37, 39 og 64.

Eisini umsitur mentamálanevndin hesar kontoir 45, 46, 47, 48, 49, 50, 51, 52, 53, 54, 560, 561, 562, 563, 564, 565, 566, 567, 568, 569, 572, 573, 574, 575, 579, 58, 582, 583, 584, 585, 587, 589, 588, 59 og 599.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við ársfíggjarætlanini álj. tkr. 70.401 og at beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

Tekniska nevndin mælir harumframt til at avsettar verða á konto 60-3500 hátíðarhald, flagging o.a. tkr. 940, 60-7170 inntøkur av parkeringsskipanini tkr. 2.500 og 60-6171 útreiðslur av parkeringsskipanini tkr. 1.500.

Tekniska nevndin umsitur konto 11, 14, 16 og 18.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir býráðnum til at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009 við 1. viðgerð.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 0 ímóti at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009 við 1. viðgerð. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, , Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.
Greiddu ikki atkvøðu Jan Christiansen , Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Vagnur Johannesen og Inga Dahl.

Jan Christiansen boðaði frá, at minnilutin kemur við broytingaruppskoti til 2. viðgerð.

**<u>2. viðgerð</u>**

**Fíggjarnevndin 25. november 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir við 2. viðgerð býráðnum til at góðkenna uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009.

Tó hevur Leivur Hansen viðmerking um, at hann ikki tekur fult undir við sundurliðingini av íløgunum.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur støðu á býráðsfundi.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen samtykti eisini at mæla býráðnum til, at áseta skattaprosentið til 19,75 og barnafrádráttin til kr. 5.500.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 27. november 2008:** Áðrenn atkvøðugreiðsluna gjørdi Jan Christiansen vart við, at minnilutin tekur undir við uppskotinum til fíggjarætlan og tekur undir við viðmerkingunum hjá Leivur Hansen.

Einmælt samtykt.

Endurskoðaði íløgukarmurin fyri árið 2009 er sum hjálagt.

**Ískoyti:**

| **Bólkur** | **2009** |
|---|---|
| **Vegir** | 22.000 |
| **Kloakkir** | 7.350 |
| **Renovation** | 5.700 |
| **Kirkjugarðar** | 800 |
| **Fríðkan av býnum** | 3.500 |
| **Ítr. og frítíðarv.** | 49.000 |
| **Barnaansing** | 1.000 |
| **Skúlar og mentan** | 113.500 |

| | |
|---|---|
| **Eldraøkið** | 3.500 |
| **Smábátahavnir** | 0 |
| **Annað** | |
| | **206.350** |

Stjórnin mælir til at broyta fíggjarætlanina samsvarandi:

Hækking av íløgum tkr. 57.150

Hækking av fígging við lántøku tkr. 57.150

Soleiðis at samlaða fíggjarætlanin javnvigar við tkr. 714.042.

**3. viðgerð**
**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá stjórnini har samlaða fíggjarætlanin javnvigar við tkr. 714.042

**Býráðið 19. mars 2009:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**76/09** **2007-0361**

**Viðvíkjandi adressubroyting + nýggjar adressur til 22 samanbygd hús á matr.nr. 1045a, á økinum við Stóragerði, Havragerði og Heygsgerði.**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Økið, ið talan er um, liggur við vegin Stóragerði. Á økinum verða bygd tvíhús og raðhús, ið eru samanbygd 2, 3, 4 og 5 hús í hvørji eind, spjadd um ognina. Harumframt verður lítið felagshús bygt í miðjuni.

Vegurin Stóragerði verður avbrotin við vegin Heygsgerði av eini transformarastøð. Av tí at hesin vegur verður avbrotin, verður tørvur á at geva vegastrekkinum frá Velbastaðvegnum til Heygsgerði nýtt navn. Harafturat skulu adressurnar Stóragerði 11 og 13 broyta talmerki, soleiðis at hesar adressur passa, og hvørt er eftir øðrum, tá ið tað nýggja økið verður tillutað nýggjar adressur.

**Gøtunavnanevndin 26. mars 2009:** Nevndin mælir til at nevna vegastrekkið frá Velbastaðvegi til Heygsgerði *Lítlagerði*, og at økið við teimum 22 nýggju samanbygdu húsunum við Stóragerði eisini fær navnið *Stóragerði*.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 1. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**77/09** **2009-0812**

**Síðugøta til Karlamagnusarbreyt**

**Lýsing av málinum**
Við Karlamagnusarbreyt er ein síðugøta vestureftir. Ivamál er, hvørt henda gøtan skal hava annað navn enn Karlamagnusarbreyt.

Skotið verður upp, annaðhvørt at síðugøtan:
1. varðveitir navnið Karlamagnusarbreyt og verður talmerkt sum vinstra síða allan vegin, við ólíka nummarrað, ella
2. fær nýtt navn við vanligari høgra og vinstra talmerking.

Uppskot 1 førir við sær, at stórur munur verður á talmerkingini á vestaru og eystaru síðu í tí norðara partinum av Karlamagnusarbreyt. Við uppskoti 2 verður talmerkingin meira fylgjandi báðumegin, og norðari parturin av Karlamagnusarbreyt tí meira samanhangandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at málið fer í Gøtunavnanevndina at koma við uppskoti um nýtt navn til síðugøtuna.

**Gøtunavnanevndin 26. mars 2009:**

Mælt verður til at nevna gøtuna *Ingibjargargøta*. Ingibjørg er móðir Karlamagnusar.

Víst verður til Aligast rímu A, Kvæðabók I, 1922, 6. ørindi:

Karlamagnus Pippingsson,
Ingibjargar barnið,
bæði gleðir hann úlv og ørn,
í blóði hirðir hann jarnið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 1. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einnmælt samtykt.

**78/09** **<u>1999-1521</u>**

**<u>Vegamótið við landsvegin á Hvítanesi (Gøta til Hvítanesar)</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur havt fundir við Landsverkfrøðingin um viðurskiftini viðvíkjandi gerð av viadukt og busslumma á vegamótinum frá landsvegnum oman í bygdina.

Landsverkfrøðingurin hevur fingið játtan fyri fígging fyri árið 2001 av arbeiðinum at gera eina viadukt undir landsvegin.

Skal viaduktin gerast, verður neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at gera eina gongubreyt í ovara borði frá íbindingini og niðan móti Vegnum Langa. Landsverkfrøðingurin hevur gjørt uppskot og kostnaðarmeting av arbeiðinum at gera eina viadukt. Umsitingin hevur gjørt uppskot til busslumma.

Um Landsverkfrøðingurin fer undir at gera viadukt, so skal Tórshavnar kommuna gera og rinda fyri gongubreyt í ovara borði, sum verður mett at kosta einar 1,5 mill. kr. Landsverkfrøðingurin hevur boðað frá, at um gongubreyt verður gjørd á niðaru síðu, so eru teir sinnaðir at gjalda fyri gongubreytina og gonguteigin tvørtur um Hvítanesvegin við Vegin Langa. Tó veitir og uppsetir kommunan gøtuljóssteyrar.

Tekniska nevndin helt ástaðarfund mánadagin 3.desember 2001, kl. 13.00. Har var avgjørt, at um hvítanesnevndin varð kunnað, so skuldi arbeiðið setast í gongd at gera gongubreyt í niðara borði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at staðfesta avgerðina frá ástaðarfundinum hjá teknisku nevndini tann 3. desember 2001, soleiðis at gjørd verður gongubreyt á niðaru síðu á landsvegnum, sum Landsverkfrøðingurin rindar fyri, og at kommunan stendur fyri og rindar gøtuljósarbeiðið.

**Tekniska nevnd 14. desember 2001:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

**Ískoyti:**
Umsitigin leggur fram uppskot frá P/F HMP Conslult til støðutakan. Økið til gøtuna verður býtt soleiðis á fylgjandi ognum:

a) Uml. 819 m² av matr. nr. ’f’, Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).
b) Uml. 384 m² av matr. nr. 135et, Hoyvík (partur av matr. nr. 2, eigari Føroya Jarðarráð).
c) Uml. 452 m² av matr.nr. ’f’, Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fyribils kostnaðarmeting frá P/F HMP Consult fer gøtan at kosta uml. 1,2 mió. kr. u/mvg, men við ráðgeving og eftirliti.

Vísandi til býtið av íløgum fyri fíggjarárið 2004 (sí notat j. nr 200400093/3), eru settar 1,0 mió kr. til gøtuna til Hvítanesar og kr. 2.677.300,- til Ytra Ringveg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til,
at taka undir við fyriliggjandi uppskoti frá P/F HMP Conslult.
at mæla býráðnum til, um figgjarnevndina, at ognartaka:
a) uml. 819 m² av matr. nr. ’f’, Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).
b) uml. 384 m² av matr. nr. 135et, Hoyvík (partur av matr. nr. 2, eigari Føroya Jarðarráð).
c) uml. 452 m² av matr. nr. ’f’, Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).
at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión, at leggja fyri nevndina aftur, tá ið eigaraviðurskiftini eru fingin í rættlag.

**Tekniska nevnd 4. mai 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Samtykt at taka upp samráðingar við eigararnar, um at kommunan ognar sær lendið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at umsitingin hevur vent sær til ein av eigarunum - Landsverk, hevur stovnurin boðað frá, at ætlaða gøtan liggur ov nær skráanum til landsvegin.

Umsitingin hevur í hesum sambandi gjørt nýtt uppskot við kostnaðarmeting til gøtusamband millum Hvítanes og Klingruna, sí j. nr. 200500503/3 og 4. Annað uppskotið er har gongugøtan verður knýtt í nýggju rundkoyringina við Vegin Langa og hitt er við eini viadukt stutt norðan fyri nýggju rundkoyringina við vegamótið Vegurin Langi/Hvítanesvegurin.

Støða skal verða tikin til um:
1. kommuan skal halda fast við áður tikna avgerð í teknisku nevnd tann 4. mai 2004, ella um
2. kommunan skal taka undir við nýggja uppskotinum,ella um
3. kommunan skal sleppa ætlanini at gera gøtu til Hvítanesar.

Kostnaðarmetingar verða framlagdar á fundinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at beina málið í hvítanesnevndina til kunningar.

**Tekniska nevnd 3. mars 2005:** Nevndin samtykti at beina málið í hvítanes-nevndina til ummælis.

**Hvítanesnevndin 9. juni 2005:** Nevndin heitir á myndugleikarnar um at skipa fyri, at Hvítanes fær somu gongubreytarloysn sum Norðasta Horn ella Oyggjar-vegurin frá Krákugjógv til gamla Dalavegin.

Nevndin vísir staðiliga á, at ein loysn hevur bráðskund, tí í dag ferðast nógv fólk til gongu á landsvegnum, eisini foreldur við barnavognum.

**Hvítanesnevndin 22. september 2005:** Nevndin minnir á málið og biður um, at málið verður loyst.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sett seg í samband við Landsverk við fyrispurningi um møgu-leika fyri at fyriskipa gongugøtuna á sama hátt, sum gjørt er fram við Velbastað-vegnum sambært áheitan frá staðbundnu nevndini frá 9. juni 2005.

Landsverk eru ikki sinnaðir at loyva hesi loysn vísandi til, at pláss ikki er fyri einum grønum geira millum koyribreyt og gongugøtu. Eisini er stovnurin ikki sinnaður at lata gera gongugøtu fram við koyribreytini, vísandi til at talan er um ein 80km/t veg. Landsverk er haraftur ímóti sinnaður at lata gøtuna liggja í skráanum.

Umsitingin hevur saman við ráðgeva latið gera nýggj uppskot sum taka støði í seinastu viðmerkingunum frá Landsverki. Uppskotini verða framløgd av ráðgeva og umsitingini.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin vísir til tilmælið til fundin í nevndini 4.mai 2004.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og at beina málið í hvítanesnevndina. (sí mál nr. 1999-1521/9).

**Hvítanesnevndin 1. desember 2005:** Nevndin vísir til skriv frá Landsverki, dagfest 25. oktober 2005, og mælir til, at tikið verður undir við uppskotinum til gerð av gøtu fram við landsvegnum við ásettum treytum, og at farið verður gongd við arbeiðið sum skjótast.

Eisini verður mælt til, at vegstokkur verður fram við allari gøtuni.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at heita á Landsverk um at gera arbeiðið.

Kr. 1.000.000 eru avsettar til arbeiðið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur innheintað kostnaðarmetan frá HMP Consult viðvíkjandi gerð av 2 m breiðari breyt aftan fyri vegstokk og sambært kravi frá LV 1,5 m frá vegastokkinum. Ein fyribils kostnaðarmetan vísir kr. 5.535.259,00.

Kostnaðarmetanin er nærri útgreinað í skjali 1999-1521/31. Viðmerkjast skal, at ognartøka er ikki íroknað.

Mett verður at talan er um eina sera dýra loysn við tað, at neyðugt er at breiðka allan høvuðsvegin, sum í støðum hevur upp til 25 m langan skráa oman eystureftir.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006**: Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Leivur Hansen, samtykti at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina, at fara undir samráðingar við Landsverk at yvirtaka Hvítanesvegin frá Eystara Ringvegi til rørportrið á høvdini norðan fyri Hvítanes.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt at taka upp samráðingar við Landsverk.

**Hvítanesnevndin 8. juni 2006:** Nevndin tekur undir við meirilutanum í teknisku

nevnd um at yvirtaka Hvítanesvegin, soleiðis at endalig loysn fæst á málinum um gongubreyt til Hvítanesar.

Nevndin biður um at fáa eina tíðarætlan fyri møguligari yvirtøku.

**Hvítanesnevndin 6. september 2007:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

Nevndin vísir aftur á gøtu í ovara borði við viadukt – vegna ferðslutrygd ella 50 km veg.

**Hvítanesnevndin 31. januar 2008:** Útsett til næsta fund.

**Hvítanesnevndin 4. september 2008:** Málið varð umrøtt. Málið verður parkerað inntil greiða er fingin á nýggja innkomuvegnum til Havnar.

Málið verður sent fíggjarnevndini til kunningar.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Kunnað varð um málið.

**Hvítanesnevndin 17. desember 2008:** Samtykt at taka málið upp við Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum, um at yvirtaka vegin.

- Umsitingin greiðir frá status í málinum.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Málið útsett.

**Tekniska nevnd 2. apríl 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til:
1. at taka upp samráðingar við Landsverk um at bøta um ferðslutrygdina við vegamótið á Hvítanesvegnum við Mannbrekku.
2. at taka upp samráðingar við landstýrismannin um yvirtøku av Hvítanesvegnum frá Eystara Ringvegi norður um íbindingina frá Sandvíkarhjalla.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**79/09** **<u>2006-0218</u>**

**<u>Mál viðvíkjandi trygdini hjá gangandi fólki við Hvítanesvegin í Hoyvík</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Uppskot er gjørt um broyting av vegamótinum Hoyvíksvegur/Mannbrekka.

**Ferðslunevndin 23. mai 2006:** Nevndin tekur undir við uppskotinum, j.nr. 2006-0218/3, dagfest 19. mai 2006. Nevndin vísir samstundis á, at ynski er at fáa landsvegamyndugleikan at umhugsa at fara undir gerð av gongu- og súkklubreyt á vegaøkinum á Hvítanesvegnum.

**Ískoyti:**
Umsitingini hjá Tórshavnar kommunu sendi 6. juni 2006 Landsferðslunevndini niðurstøðuna hjá ferðslunevndini frá 23. mai 2006.

Í skrivi frá Landsverki, móttikið 11. september 2006, verður greitt frá, at Landsverk hevur gjøgnumgingið uppskotið, dagfest 19. mai 2006, frá Tórshavnar kommunu um ferðtálming/trygging av vegamótinum Hvítanesvegur/Mannbrekka.

Uppskotið er í trá við hugsanirnar hjá Landsverki, nevniliga at gera eina rundkoyring á Hvítanesvegnum og beina Mannbrekku yvir á Mýruna og síðani í rundkoyringina.

Harumframt skal Kúrdalsvegur eisini bindast í rundkoyringina.

Talan er tá um eina lítla rundkoyring (D=27m), og metir Landsverk, at hendan samstundis kemur at virka soleiðis, at tung ferðsla ikki fer at nýta Mannbrekku og Kúrdalsvegin, samstundis sum ferðin eftir Hvítanesvegnum fer at minka munandi.

Aftaná at Tórshavnar býráð hevur viðgjørt uppskotið, meta vit at málið er búgvið til at verða viðgjørt í Landsferðslunevndini.

Eftir stendur bara, at í løtuni er peningur ikki tøkur til at fara undir at gera arbeiðið, og noyðast vit tískil at bíða eftir politiskari loysn hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at staðfesta avgerðina hjá ferðslunevndini frá 23. mai 2006 tó við teirri broyting, at rundkoyringini hevur eitt tvørmát á 27 metur, sum Landsverk vísir til í skrivinum, og síðan at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið til endaliga støðutakan fyri síðan at senda málið í Landsferðslunevndina.

**Tekniska nevnd 5. oktober 2006**: Málið útsett.

**Ískoyti:**
Landsverk hevur boðað frá, at ein møgulig yvirtøka av Hvítanesvegnum er tengd at framtíðar viðurskiftum viðv. atkomuvegnum til Havnar.

Trupult er at siga hvørja ávirkan nýggi atkomuvegurin til Havnar kemur at hava á ferðslutrýstið í økinum og harvið tørvin á eini møguligar rundkoyring.

**Tekniska nevnd 30. november 2006:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at heita á Landsverk um at bøta um ferðslutrygdina við vegamótið á

Hvítanesvegnum við Mannbrekku, soleiðis at tað verður tryggari hjá børnunum at fara um vegin.

**Býráðið 14. desember 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Umsitingin greiðir frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Málið varð útsett.,

**Tekniska nevnd 2. apríl 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til :

3. at taka upp samráðingar við Landsverk um at bøta um ferðslutrygdina við vegamótið á Hvítanesvegnum við Mannbrekku.
4. at taka upp samráðingar við landstýrismannin um yvirtøku av Hvítanesvegnum frá Eystara Ringvegi norður um íbindingina frá Sandvíkarhjalla.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**80/09** **<u>2006-2052</u>**

**<u>Umval av býráðslimi í bygginevndina fyri vardar íbúðir á Óðinshædd</u>.**

**Býráðið 21. september 2006:** Vald vórðu Elin Lindenskov og Beate L. Samuelsen.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Elin Lindenskov og Vagnur Johannesen.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Vald vórðu Maria Hammer Olsen og Vagnur Johannesen.

**81/09** **<u>2009-0381/2 SG</u>**

**<u>Heimildarætlan millum faknevndir og umsiting</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Spurningurin um heimildarbýtið millum faknevndir og umsiting hevur seinastu tíðina verið reistur við jøvnum millumbilum.

Ein orsøk til hetta er í sambandi við kærumál hjá Lendisnevndini. Síðani henda kærunevnd varð sett á stovn í 2007 hava kærarar javnan ført fram sjónarmiðið, at umsitingin hevur ikki heimild at nokta tí tey søkja um, tí tað skal avvarðandi politiskt valda faknevnd gera. Kærunevndin í Lendismálum hevur í onkrum føri spurt um hvussu hesi viðurskifti hanga saman hjá kommununi.

Hetta sjónarmið er eisini onkuntíð ført fram av advokatum, sum umboða onkran umsøkjara – seinast í sambandi við mál nr. 2006-2128.

Leiðslan á tekniska økinum hevur umrøtt spurningin við m.a. løgdeildina, og greitt er, at tað vildi verið ein fyrimunur fyri kommununa, at tað vóru greiðar ásetingar um hvat er delegerað til umsitingina at avgreiða, ásett í eini heimildarætlan, og somuleiðis at tað verður greitt ásett hvør hevur hesa delegatiónsheimildina.

Málið um heimildir hevur eisini verið umrøtt í øðrum sambandi – nevnliga í sambandi við umrøðuna av avgreiðslutíðum fyri mál, og í hvussu stóran mun faknevndirnar skulu viðgerða slíkt, sum kann kallast vanlig avgreiðslumál.

Ongin ivi er um, at um tænastan til borgaran skal betrast við at fáa skjótari avgreiðslutíðir, er neyðugt at umsitingin fær heimild at avgreiða fleiri mál enn í dag, uttan nevndarviðgerð.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur á fundi 2. febr. 2009 samtykt eina heimildarætlan fyri byggimál, sum umsitingin hevur fingið heimild at avgreiða uttan nevndarviðgerð. Víst verður til mál nr. 2009-0168.

Fyri at hava eina smidliga skipan á hesum øki, har tað skal bera til hjá avvarðandi faknevndum bæði at víðka um og minka um heimildirnar hjá umsitingini, er neyðugt at fíggjarnevndin sum starvsfólkanevnd, og býráðið sum evsta vald kommununar, geva faknevndunum eina standandi heimild at útdelegera heimildir til umsitingina ella at taka aftur útdelegeraðar heimildir.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til:

1. at býráðið gevur øllum faknevndum eina standandi heimild at útdelegera uppgávur á sínum umsitingarøki, sambært stýrisskipanini og fundarskipanini, til umsitingina at avgreiða
2. at faknevndirnar hvør sær gera eitt skrivligt yvirlit yvir tær heimildir, sum verða útdelegeraðar til umsitingina

3. at faknevndirnar eina ferð árliga lata býráðið og fíggjarnevndina dagført yvirlit yvir tær heimildir, sum eru útdelegeraðar til umsitingina – fyrstu ferð hin 1. apríl 2009 - og annars loypandi um allar broytingar í heimildarætlanunum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Jóhan E. Simonsen, leiðari fyri løgdeildini hevur gjørt notat um delegatión (heimiling), sum er journaliserað.

Samtykt at leggja málið fyri býráðið til umrøðu, áðrenn støða verður tikin til tilmælið.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Býráðið umrøddi málið og beindi tað aftur í fíggjarnevndina.

**82/09** **2009-1076**

**Uppskot um at krevja depositum fyri at standa á bíðilista til grundstykkir til vinnuligt endamál í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Á bíðilista til grundstykkir til vinnuligt endamál í Tórshavnar kommunu, standa í løtuni 177 fólk/virkir, sum eru býtt soleiðis:

| | |
|---|---|
| Kollafjørður og Signabøur | 11 |
| Tórshavn, Argir og Hoyvík | 158 |
| Nólsoy | 0 |
| Kaldbak og Kaldbaksbotnur | 6 |
| Velbastaður og Kirkjubøur | 2 |
| Hestur og Koltur | 0 |
| Norðradalur og Syðradalur | 0 |
| Íalt | 177 |

Soleiðis sum reglarnar fyri bíðilistan til grundstykkir til vinnuligt endamál eru, ber til hjá øllum – eisini teimum, sum ikki búgva í Tórshavnar kommunu – at seta seg á listan og so ofta, sum teimum lystur. Hetta hevur havt við sær, at tað eru fleiri, sum hava sett á bíðilistan fleiri ferðir. T.d. eru á bíðilistanum fyri Tórshavn, Argir og Hoyvík sjey persónar/virkir, sum hava sett seg á listan tvær ferðir, meðan tað eru fýra persónar/virkir, sum hava sett seg á listan ikki minni enn tríggjar ferðir.

Samstundis, sum tað ber til at seta seg á bíðilistan, so ofta einum lystur, so ber til at takka nei til eitt boðið grundstykki so ofta einum lystur, uttan at hetta fær avleiðingar (sum t.d. at verða strikaður av listanum). Hetta hevur havt við sær, at tann, ið stendur fremst á bíðilistanum fyri Tórshavn, Argir og Hoyvík, hevur staðið har síðani 1998, hóast mong grundstykkir hava verið boðin viðkomandi hesi seinastu 11 árini. Hesin sami persónur stendur eisini sum nr. 20 á sama bíðilista.

Hóast flestu persónarnir/virkini á bíðilistanum eru úr Tórshavnar kommunu, eru 19 umsøkjarar, sum hava heimstað aðrastaðni. Hesi koma úr Klaksvík, Sandavági, Sørvági, Kvívík, Vestmanna, Skopun og Strondum, umframt útlondum sum Danmark, Norra, Íslandi og Spanien.

Tað er fatanin hjá umsitingini, at um kommunan her og nú hevði grundstykkir at bjóða øllum 177, sum standa á bíðilistanum, so hevði minni enn ein triðingur av teimum verið áhugaði í at tikið av tilboðnum.

Samanumtikið kann sigast, at orsakað av omanfyri nevndu viðurskiftum, er eingin veruligur samanhangur millum talið av umsøkjarum á bíðilistanum og veruliga tørvin á grundstykkjum, og tí er bíðilistin til grundstykkir til vinnuligt endamál ónýtiligur at leggja ætlanir eftir.

Fyri at fáa bíðilistan at avspegla veruliga tørvin verður skotið upp, at kravt verður eitt depositum á kr. 10.000,00 fyri hvørt navn, sum stendur á bíðilistanum. Depositum verður so endurgoldið, tá viðkomandi fer av aftur bíðilistanum, tað verið seg tí at viðkomandi fær tillutað eitt grundstykki, ella tí viðkomandi ikki longur ynskir at standa á bíðilistanum. Eitt slíkt deposita fer væntandi at hava við sær, at øll tey, sum hava sett seg á listan uttan at hava ein veruligan tørv, og øll tey, sum hava sett seg fleiri ferðir á listan *"tí tað einki kostar og ongar bindingar hevur við sær"*, fara at biðja um at verða strikaði av listanum. Hinvegin hava tey, sum veruliga hava tørvin, neyvan nakað ímóti at deponera kr. 10.000,00 – sum tey fáa aftur – fyri at fáa hendur á einum grundstykki. Á hendan hátt fæst sostatt ein bíðilisti, sum kann nýtast sum eitt veruligt amboð at tilrættisleggja eftir.

Ætlanin er, at tey nýggju, sum framyvir ynskja at koma á bíðilistan, verða kravd eftir depositum, áðrenn tey sleppa á listan. Tey 177, sum longu nú standa á listanum, skulu hava eitt skriv har upplýst verður um samtyktina at krevja depositum, og har tey fáa 1 mánað freist at gjalda. Verður ikki goldið innan freistin er úti, verða tey strikaði av listanum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og deildarleiðarin á løgdeildini mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at samtykkja, at kravt verður eitt depositum á kr. 25.000,00 fyri hvørt pláss á bíðilistanum til grundstykkir til vinnuligt endamál. Depositum verður endurgoldið, tá viðkomandi fer av aftur bíðilistanum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jan Christiansen

**83/09** **2009-0335**

**Umsókn frá Café Natúr Sp/f um byggiloyvi til glastakt øki til útiveiting á matr. nr. 571a, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
3. feb. 2009 kemur umsókn frá Café Natúr Sp/f (v. Rúna Olsen, stjóra) um loyvi til at gera økið oman ímóti Kongabrúnni partvís til útiveiting.
Umsøkjarin sigur, at ætlanin er at gera veitingarøkið á ein slíkan hátt, at tað ikki nervar útsjóndina á verandi húsi. Víðari verður sagt, at tilfarið er fyri tað mesta glas, soleiðis at suðurendin á verandi húsi enn sum áður kemur til sín rætt og varðveitir sína støðu sum ein av vakrastu býarmyndunum í Tórshavn. (sí 3D mynd)
Hildið verður fram, at runt plássið sunnanfyri húsið, eins og fram við vestursíðuni á húsinum verður girðing (gjørd eftir gomlum sniði) uppsett, soleiðis at fólk trygt kunnu ferðast til gongu framvið Café Natúr uttan ampa av bilferðsluni, ið er framvið húsinum. (sí tekn. 001)

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í 2. Grundumráði.:

1. *2. Grundumráði verður alt sum tað er lagt til blandaða bústaða-og miðstaðabygging. Mið-staðabyggingin má einans vera hús, ið heilt ella lutvíst verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
2. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.*
3. *Nettonýtslstigið má ikki fara upp um 0,5. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200m² ella minni fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200m² og 500m² verða sett javnt minkandi, soleiðis sum mynd 2 vísir.*
4. *Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi í 2 hæddum við nýttum lofti og ikki vera hægri enn 7 m til yvirgrindina og 10 m til mønuna mált frá meðaljørðildi (meðal við húsahornini). Kjallari verður roknaður sum húsahædd um so er, at loftið er meira enn 1,0 m oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd má vera.*
5. *Hús skulu vanliga standa fyri seg og verða sett í veglinju, har ein tílík er løgd Tó kann verða loyvt at samanbyggja hús, tá ið umstøðurnar eftir meting býráðsins gera tað ráðiligt*
6. *Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3,4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó má nettonýtslustigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,0.*

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundøkið, matr. nr. 571a er 128m² til víddar. Ánari er Sp/f 1.6.1996.
Ábygt er eitt hús á <u>allari</u> ognini.
Byggistigið er 1,0. Mest loyvda byggistig er 0,5.
Nettonýtslustigið er 1,5. Mest loyvda nettonýtslustig er 0,75.

**Ískoyti:**

Víst verður til J. nr. 2009-0360 viðvíkjandi brúksrætti, leigusáttmála ella keyp av matr. nr. 572 (uml. 37m²), matr. bø (uml. 20m²) og uml. ein fjórðing av matr. nr. 573 (uml. 21m²) ella uml. 78m² tilsamans, ið Tórshavnar kommuna eigur.
Viðmerkjast skal eisini, at timburtrappan upp á pallin á suðurendanum stendur sum er inni á matr. nr. 572.

**Tekniska deild hevur havt málið til ummælis og eru hesar:**
Í sambandi við byggimálið vil Café Natúr sleppa at seta girðing upp heilt út móti vegi.

Sera nógv fólk er til gongu í bólkum á hesum øki, serliga um summari tá ferðamannaskipini vitja og hava hesi tørv á nógvum plássi at standa á, meðan tey bíða eftir at sleppa tvørtur um vegin.

Plássið, sum fólk standa á og bíða eftir at sleppa yvir um vegin, kann ikki latast til annað endamál.

Plan- og rakstrardeildin er av tí fatan at tað er óheppið at fólk til gongu skulu tvingast inn á eitt skeinkipláss, tá ein er til gongu oman móti Kongabrúnni.

Semja var um, at verður byggimálið gingið á møti, so eigur greiður skilnaður at verða millum fólk, ið ganga framvið á gongubreytini og fólki við ørindum á skeinkiøkinum.

Hildið var somuleiðis, at trygdin hjá fótgangarum verður munandi skerd um loyvi verður givið at seta girðing úti við kantsteinin.

Fólk sum ganga á vegnum skulu altíð kunna stíga til viks inná gongubreytina undan bilum.

Mælt verður tí staðiliga frá at ganga umsóknini á møti.

Um umsóknin verður gingin á møti, verður mælt til, at girðing verður sett upp 2.5 m frá marki vestureftir (Áarvegur), 2 m frá marki eystureftir (Kopargøta) og 4 metrar frá marki suðureftir (Kongabrúgvin). Hetta merkir, at økið sum loyvi verður at girða er uml. 12 ferrmetrar til víddar.

Víst verður til tekning, sum liggur í málinum j.nr. 2009-0335/3.

**Ískoyti:**
Eftir ynski frá umsitingini hevur umsøkjarin broytt girðingina, soleiðis at hon einans er framvið Áarvegnum. (sí tekn. nr. 001A dagfest 20.03.2009).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at geva byggiloyvi um avtala fæst við kommununa um brúksrætt, leigusáttmála ella keyp av matrikklinum, og

somuleiðis at beina málið til ummælis í teknisku nevnd, áðrenn endaliga góðkenning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mars 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Nevndin samtykti eisini, at málið verður sent til ummælis hjá heilsu- og umhvørvisdeildini.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at mæla býraðnum til at leiga sp/f Cafe Natúr umbidna økið sambært uppskoti til leigusáttmála, og at senda málið í heilsu- og umhvørvisnevndini og teknisku nevnd.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**84/09** **2009-0830**

**Umbøn um eykajáttan til Hoyvíkar skúla**

Í august 2009 byrja tríggir 8. flokkar í Hoyvíkar skúla. Skúlin hevur ikki havt 8. flokk frammanundan.

Í játtanini fyri 2009 til Hoyvíkar skúla er hædd tikin fyri, at tríggir 8. flokkar verða í skúlanum, men hædd er ikki tikin fyri stovningarútreiðslum til hesar flokkar. Skúlin hevur ikki havt 8. flokk fyrr, og tí er neyðugt at keypa útgerð til alisfrøði, stólar og borð til ein flokk, flokksett av bókum til allar lærugreinar, orðabøkur og tilfar til bókasavnið.

Útreiðslurnar at stovna tríggjar 8. flokkar í Hoyvíkar skúla eru mettar til kr. 459.000.

Umsitingin hevur roynt at funnið peningin á økinum. Møguleiki er at taka av kontunum hjá Hests skúla, Velbastaðar skúla, Hoyvíkshøllini og Kvøldskúlanum.

Hests skúli ( konto 20 ) hevur yvirskot frá undanfarna fíggjarárið, og skúlin megnar at halda játtanina hóast tikið verður av kontuni.

Velbastaðar skúli ( konto 22 ) játtanin til reingerð varð av óvart hækkað ov nógv í ár.

Hoyvíkshøllin ( konto 291) hevur eina minninýtslu í 2008, og mælt verður til at flyta alla minninýtsluna til Hoyvíkar skúla.

Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli ( konto 31 ). Skúlin hevur eina stóra minninýtslu í 2008. Skúlin hevur ikki loyvi at flyta ímillum ár. Mælt verður tó til, at kr.150.000 av minninýtsluna verða fluttar til Hoyvíkar skúla.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at eykajáttan á kr. 459.000 verður veitt Hoyvíkar skúla til stovningarútreiðslur til tríggjar 8. flokkar, og at eykajáttanin verður tikin av hesum kontum:

| | | |
|---|---|---|
| av konto 20 | Hests skúli | 30.000 kr. |
| av konto 22 | Velbastaðar skúli | 50.000 kr. |
| av konto 33 | Felags skúlamál | 50.000 kr. |
| av konto 291 | Hoyvíkshøllin | 179.000 kr. |
| av konto 31 | Kvøldskúlin | 150.000 kr. |

**Mentamálanevndin 1. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt, við 5. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2009, at taka undir við fíggjarnevndini og at hækka konto 29 við 459.000 kr.

**85/09** **2004-0214**

**Nýggjur fólkaskúli við Løgmannabreyt.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur avgjørt at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum. Frítíðarskúlin skal hýsa 1. og 2. flokki.

Í heildarætlanini skal pláss leggjast av til svimjihyl, sum møguliga kemur seinni.

Eftir starvsskipanini hjá kommununi í byggimálum fær mentamáladeildin eina byggiskrá til vega. Henda byggiskrá verður síðani grundarlag undir útinning av verkætlanini, sum byggideildin hevur ábyrgdina av.

Endamálið við byggiskránni er:

at orða og samskipa tørv, ynski og krøv arbeiðsánarans
at útgreina, í hvønn mun tað ber til at ganga hesum tørvi, ynskjum og krøvum á møti
at vísa á prinsipployysnir á hesum grundarlagi

Við tí í huga at støðug menning og broyting er innan skúlaøkið, og at roknast kann við umskipaðum virksemi, tá nýggir karmar loyva hesum, er lítið sannlíkt, at tað ber til at gera eina neyva meting nú av, hvussu virksemið verður, tá ætlaða bygg-ingin verður tikin í nýtslu. Tí er dentur lagdur á at skapa so víðar og broytiligar umstøður sum gjørligt til skúlan.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur staðið fyri byggiskránni, hevur viðgjørt stakspurningar saman við fólki við serligum innliti, tá tað hevur verið mett neyðugt.

Byggiskráin er býtt upp í 4 partar:

1. Almennur partur
2. Námsfrøðiligur partur
3. Hølisskrá
4. Byggitøkni

**Grundøki**
Kommunan hevur lagt av eitt øki við Løgmannabreyt til skúlan. Víddin er sambært korti 17.600 m². Økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Støddin tykist hóskandi, tá hugsað verður um tørvin á byggilendi (nakað minni enn 5.000 m², tí bygt verður væntandi í meira enn einari hædd), fríøki (minst eini 10 m² fyri hvønn næming) og ferðslu (vegir, gøtur, bilpláss). Tá farið verður undir at gera byggiuppskot, má kortini metast um støddina við atliti til byggihátt, landslag og ferðslu.

**Kostnaður**
Bygningsstøddin er ásett av Tórshavnar kommunu. Støddin er grundað á eina brutto gólvvídd uppá 11 m² fyri hvønn næmingin. Afturat hesum kemur pláss til frítíðarskúla í 1. og 2. flokki, og pláss til skúlabarna-tannlækna.

Samlaða næmingatalið, tá skúlin er fult útbygdur, kann setast til eini 450. Tá er roknað við 18 flokkum við 25 næmingum.

Út frá hesum kann væntast, at samlaða gólvvíddin verður umleið 5.400 m².

**Kostnaðarkarmur**
Sum grundarlag undir framhaldandi ráðleggingini ber helst til at siga, at samlaða íløgan uttan meirvirðisgjald verður:

5.400 m² av gólvvídd fyri 5.400 m² x kr. 18.000 = 97,2 mill. kr.

Hetta má kortini metast sum ein vegleiðandi karmur, til støða er tikin til, hvussu byggiætlanin skal fremjast.

**Tíðarætlan**
Skotið verður upp, at skúlin skal byggjast í einum, men byggingin skal leggjast soleiðis til rættis, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla skjótast gjørligt, og hinir so hvørt byggingin verður liðug.

Eftir tíðarætlanini verður allur skúlin liðugur á sumri 2006.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at góðkenna fyriliggjandi byggiprogramm, at projektering verður sett í verk beinanvegin, og at peningur verður játtaður til hetta av íløguætlanini 2003 og 2004.

**Mentamálanevndin 16. september 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamáladeildarleiðaranum og leggja málið fyri býráðið.

Eisini samtykt at heita á plandeildina um at skipa soleiðis fyri, at yngstu flokkarnir sleppa í skúla í august 2005, og hinir flokkarnir so hvørt byggingin verður liðug.

**Býráðið 25. september 2003:** Einmælt samtykt at taka undir við mentamála-nevndini við tí ískoyti, at málið verður lagt aftur fyri býráðið, tá dispositión og projektuppskot eru liðug.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til:

1) at verkætlanin verður gjørd í ”partnering”.

2) at projektuppskot verður gjørt at leggja fyri nevndina aftur til góðkenningar saman við kostnaðarmeting og cachflow.

3) at arbeiðið verður boðið út, tá projektuppskotið er gjørt, og at teir bjóðandi verða 3 entreprenørar, sum hava royndir innan partnering.

4) at ein treyt í útbjóðingartilfarinum verður, at teir bjóðandi í størsta mun skulu nýta føroyskar undirarbeiðstakarar.

5) at tilboðini, sum koma inn, verða løgd fyri nevndina aftur til støðutakan við tilmæli frá stýrisbólkinum.

6) at stýrisbólkurin verður mannaður soleiðis:
Eitt umboð fyri arbeiðsánaran,
Eitt umboð fyri arkitektin,
Eitt umboð fyri verkfr. (møguligt)
Eitt umboð fyri entreprenørin

7) at arkitektaráðgevi verður settur beinanvegin, og verkfrøðingaráðgevar tá tørvur er á tí.

8) at kommunan setur ein samskipara/skrivara í starv á planleggingardeildini í fulla tíð til burturav at taka sær av verkætlanini, og at hetta starv verður lýst leyst. Starvið skal verða tíðaravmarkað frá febr./mars 2004, til byggingin er liðug og avhendað.

9) at projektleiðari verður valdur av stýrisbólkinum, tá hesin, eftir útbjóðing hevur sett organisatiónina saman.

Umframt omanfyri nevnda mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til, at mentamálanevndin tekur støðu til:

10) um ítróttarhøll ella fimleikahallirnar skulu gerast.

11) um graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennufjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 19. november 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum, men spurningurin um útbjóðingarhátt verður viðgjørdur á einum seinni fundi.

Eisini samtykt at taka undir við, at ein dupult fimleikahøll verður gjørd og at taka undir við at graslíkisvøllur við rennibreyt, gummivøllur til rennifjalir og umstøður til nakað av frælsum ítrótti skal verða við í verkætlanini.

**Mentamálanevndin 3. desember 2003:** Samtykt at fara undir projekterings-arbeiðið beinanvegin og gera uppskot til arbeiðs- og tíðarætlan at leggja fyri nevndina á fyrsta fundi 2004.

Málið verður sent til byggideildina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til hvønn av omanfyri nevndu møguleikum skal arbeiðast eftir.

**Mentamálanevndin 10. februar 2004:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við uppskoti 2 at leggja fyri nevndina skjótast gjørligt og beina málið í byggideildina.

**Mentamálanevndin 3. mars 2004:** Samtykt at byggja ein skúlabygning við verandi Hoyvíkar skúla, sambr. støðumynd, dagfest 3. mars 2004, sum skal kunna hýsa yngstu flokkunum og frítíðarskúla.

Eisini samtykt at játta kr. 100.000,00 av íløgujáttanini 2004 til ger av dispositiónsuppskoti at leggja aftur fyri nevndina skjótast gjørligt, og beina málið til byggideildina.

**Ískoyti:**
Árni Winther, ark., hevur gjørt dispositiónsuppskot.

**1. Inngangur**
Tórshavnar kommuna hevur latið gera eina byggiskrá, sum lýsir ætlanina at byggja ein nýggjan skúla í Hoyvíkshaganum. Byggiskráin er í fýra pørtum og dagfest juni 2003. Byggiætlanin er síðani viðgjørd politiskt og námsfrøðiliga. Eftir ársskiftið varð arbeiðið at fáa til vega eitt skipanaruppskot sett í verk.

Stórur tørvur er á nýggjum skúla í økinum. Kortini hevur kommunan mett, at ein so stór verkætlan skal umhugsast gjølla, áðrenn farið verður undir byggingina. Tí verður arbeitt við at fáa skúlastovur tøkar við verandi Hoyvíkar skúla frá skúlaárinum 2005/2006 til yngstu flokkarnar. Hesir flyta so í nýggja skúla, tá hann er klárur at taka í nýtslu.

Ætlanin er at byggja nýggja skúlan so skjótt, hetta verkliga letur seg gera, og fíggjarorkan hjá Tórshavnar kommunu loyvir.

**2. Grundøki**
Í heildarætlanini fyri Hoyvíkshagan hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt økið av til nýggjan fólkaskúla. Økið er eystan fyri Løgmannabreyt, niðan fyri innkoyringina til útstykkingina, ið nú er í gerð. Eystast er hagalendi við jøvnum halli suðureftir, í miðjuni eitt gil við einum hamarskapilsi upp frá eystureftir, og eystasti parturin er ein slætti við jøvnum halli suðureftir. Ein lítil graslíkisvøllur er inn frá Løgmannabreyt.

Á grannaøkinum eystanfyri er partur av ætlaðu miðstaðarbyggingini, sum gongur oman og niðan frá Vegnum Langa.

Samlaða støddin á økinum, sum er sett av til skúlan, er umleið 17.600 $m^2$.

**3. Innrættingin námsfrøðiliga**
Hølisskipanin byggir á tann partin av byggiskránni, ið lýsir námsfrøðiligu hugtøkini, sum skúlin skal virka eftir. Arbeiðsbólkurin, ið tilevnaði byggiskránna, hevur havt høvi at gera viðmerkingar, meðan arbeitt hevur verið við skipanaruppskotinum.

Grundhugsjónin er: “at byggiháttur og innrætting skúlans er fyriskipað soleiðis, at tað ber til at hava eina fjølbroytta undirvísing, ið verður lagað eftir tørvi og fortreytum næminganna.”

Hølini eru av hesi orsøk ymisk í skapi, stødd, hædd, tilfari, litum og ljósi.

Flokkarnir hoyra til “heimsrustir”, sum umfata:
- 1.-3. flokk við frítíðarskúla
- 4.-5. flokk
- 6.-7. flokk
- 8.-9. flokk

Serhøli er í fakdeplum, sum hava hvør sínar bygningskarmar, svarandi til ymiska tørvin.

**4. Lendisskipan**

Tilkoyring er skipað í samstarvi við vegaumsitingina soleiðis, at børn trygt kunnu verða sett av í lumma framvið Løgmannabreyt, og bilarnir fáa vent í komandi rundkoyring beint omanfyri.

Bilar, ið skulu steðga, koyra eysturum við tilkoyring frá nýggja miðstaðarøkinum har. Pláss er fyri umleið 60 parkeringsplássum. Økið eystanfyri er harumframt lagt av til ítróttarendamál.
Vestanfyri er góður sólargangur og møguleiki at skapa lívd, so her eru spælipláss og fríøki til næmingarnar. Sunnanfyri er útiøki uppat matarhøll, og skermað útiøki til yngstu næmingarnar í skúla og frítíðarskúla.

Í byggiskránni var kravt, at øki skal ávísast til eina nýggja svimjihøll. Mælt verður til, at henda verður partur av miðstaðarøkinum, sum liggur høgliga fyri hjá skúlanum og almenninginum, og kann brúka somu parkeringspláss, tá skúlin ikki er í nýtslu

**4. Umfatan**

Í byggiskránni grein 5.1 vóru nakrar metingar gjørdar um samlaðu gólvvíddina, grundaðar á ein karm uppá 11 m² fyri hvønn næming, ið Tórshavnar kommuna hevur víst á. Samlaða støddin var út frá hesum sett til 5.400 m², har umleið 450 m² vóru til heilsurøkt og frítíðarskúla.

Eisini var í hesi grein í byggiskránni sagt: “*So hvørt byggiætlanin gerst meira ítøkilig, verður mett um, hvussu støddarkarmurin hóskar.*”

Í skipanaruppskotinum eru ynski og krøv til innrætting samanfatað í eini ítøkiligari byggiætlan, har hvør einstøk funktión er vigað eftir námsfrøði, bygging og stødd/kostnaði.

Fyri at halda støddarkarmin, eru nakrar raðfestingar gjørdar í byggiskránni.

Mett verður, at heimaøkini ikki kunnu gerast munandi minni um námsfrøðiliga grundhugsanin ikki skal fara fyri skeyti. Somuleiðis er støddin á flestu fakhølum á markinum til tað sum krevst.

Hinvegin er økið til ítrótt minkað samanborið við ásetingarnar í byggiskránni, har ynski varð tvær hallir nakað størri enn vanligar himleikahallir, umframt pláss til amboð, neyðug skiftirúm o.a.

Orsøkin til hesa minking er partvís, at ítróttarøki er sera plásskrevjandi fyri hvønn næming, og partvís tí, at á donsku skúlunum, ið bygdir eru sambært somu fortreytunum, er eitt ikki so stórt multirúm til ítrótt, ístaðin fyri eina ella fleiri fimleikahallir/ítróttarhallir.

Hølisyvirlit:

| | |
|---|---|
| Heimrustir | 2.141 m² |
| av hesum frítíðarskúli | 237 m² |
| Felagsøki og fyrisiting | 1.608 m² |
| Ítróttur | 685 m² |
| Fakdeplar | 890 m² |
| Heilsurøkt | 126 m² |
| Bruttostødd tilsamans | 5.450 m² |

**4. Byggitøkni**

Sum grundarlag undir byggiháttinum eru hesar fortreytir valdar:

- Tað er av stórum týdningi, at tilfar og konstruktiónir tola ætlaðu nýtsluna. Hetta hevur týdning bæði fyri at skúlin ikki alt fyri eitt sær slitin út, so næmingarnir ikki virða bygningskarmarnar, og fyri at viðlíkahaldið ikki skal gerast ov stórt.
- Fyri at avmarka íløguna mest møguligt, verða einfaldar loysnir valdar, allastaðni har tað ber til.

Vit ímynda okkum lættar konstruktiónir, helst úr stáli og timbri, við neyðugum stoyptum konstruktiónum. Bygningsskapið ger, at tryggar loysnir kunnu veljast til at fáa tett móti avfalli og vindi.

Støða er ikki tikin til uttandura klæðing av veggjum og tekju. Tilfarið skal tola veðurlag og slit av nýtsluni, og avmarka viðlíkahaldið. Skilaveggir úr plátum við neyðugari styrki og ljóðdoyving. Loftini eru klødd við ljóðdoyvandi gipsplátum. Gólv løgd við t.d. linoleum, í duri flísar. Innhurðar við massivum hurðabløðum.

Roknað er við, at heimrustir, heilsurøkt og verkstaðsbygningur verða sjálvstøðugar brunaeindir í eini hædd við rýmingarleiðum beinleiðis út í lendið. Hetta er mest einfalda loysnin. Brunatrygd í felagsøkjum skal tryggjast eftir samráðing við myndugleikarnar við atliti til nýtslumøguleikar og kostnað.

Hóast ongi lógarfest krøv eru, verður mælt til, at rørslutarnað fáa brúkt skúlan. Hetta er gjørligt við vístu skráunum og lyftu.

Krøvini til inniklima eru lógarfest. Sambært reglunum skal mekaniskt luftskifti verða í nýggjum skúlum. Tó ber til at víkja frá hesum, um tað er sannlíkt, at inniluftin verður nóg góð við øðrum tiltøkum. Við okkara royndum á økinum mæla vit til, at loftshæddin verður stór og teldustýrt natúrligt luftskifti tryggjað. Fortreytin fyri, at hetta riggar er, at sólskermingin er munagóð.

Roknað er við fjarhita. Mælt verður til at kanna, um tað loysir seg at brúka tekjuna til orkuískoyti við sólorku.

Bygningurin skal fyrireikast til tráðleysa samskiftisútgerð.

**5. Tíðarætlan**

Verkætlanin verður útint við støði í tíðarætlan, *Fylgiskjal 2*, til byggiskránna. Staðfestast kann, at fyrireikingararbeiðið viðvíkjandi uppskotsstiginum ikki varð klárt at byrja sum ætlað, og at tað hevur tikið drúgvari tíð enn mett. Kortini forðar hetta ikki fyri, at komandi arbeiði verður gjørt innanfyri tey ætlaðu tíðarskeiðini frá nú at rokna.

Tá støða er tikin til, hvussu skúlin verður tikin í nýtslu, og tá greitt er, hvussu íløgukarmurin fyri hesa bygging sær út í mun til heildarkarmin hjá kommununi, verður tíðarætlanin endurskoðað.

**6. Kostnaður**

Verður metingin í byggiskránni (grein 5.2.) endurskoðað við somu fortreytum (m.a. príslegu várið 2003), við støði í støddini sambært *4. Umfatan* verður úrslitið:

5.450 m$^2$ av gólvvídd fyri kr. 18.000 = 98,1 mill kr.

Ein meira nágreinilig meting, sum byggir á veruligar nøgdir sambært hesi verkætlan, skal gerast í næsta arbeiðsstiginum, tá yvirskipað støða er tikin til bygningskonstruktiónir og –innleggingar.

**Víddin økjast**

Skal samtyktin í mentamálanevndini uppfyllast um, at skúlin skal innihalda eina dupulta fimleikahøll, má víddin økjast við 175 fermetrum.

Meirkostnaðurin fyri hesar fermetrarnar er 3,2 milliónir krónur, roknað út frá somu fortreytum sum samlaða kostnaðarmetingin.

Heildarætlanin verður ikki ávirka annars av hesi øking.

Árni Winther, arkitektur, kemur at greiða frá uppskotinum.

Mentamálanevndin 30. juni 2004: Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at góðkenna skipanaruppskotið frá mai 2004, tó við tí broyting at ein dupult fimleikahøll verður gjørd, sum krevur umleið 175 m² afturat, og at høli til tannlækna og heilsukanningar verður víðkað við umleið 50 m².

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 2. september 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at taka undir við tilmælinum um at byggja nýggjan fólkaskúla í Hoyvíkshaganum tó við teirri broyting, at ásetingin, um at skúlin bert skal fevna um 1. til 9. flokk, verður tikin burtur. Í staðin fyri verður mælt til at beina málið aftur í mentamálanevndina til nýggja viðgerð og støðutakan til, um ikki skúli eigur at vera fyri næmingum í 1. til 10. flokki í Hoyvíkshaganum.

Atkvøtt var um kravið frá Heðini Mortensen um at beina málið aftur í mentamálanevndina, sum var samtykt við 6-2 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Jákup S. Joensen. Ìmóti atkvøddu Leivur Hansen og Elin Lindenskov.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi 25. september 2003 at taka undir við mentamálanevndini, at kommunan fór at byggja nýggjan 2-sporaðan fólkaskúla við frítíðarskúla til 1.-9. flokk í Hoyvíkshaganum.

Grundarlagið undir samtyktini var, at mentamálanevndin á fundi 25. september 2002 samtykti, at skúlin við Løgmannabreyt verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk, og at núverandi Hoyvíkar skúli verður ein 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk.

Somuleiðis varð samtykt, at 10. flokkarnir fara oman í Eysturskúlan. Eisini fara næmingarnir í Kollafirði í 8. og 9. fl. at vera í skúlanum í Kollafirði.

Í sambandi við avgerðina um at hava framhaldsdeild í Hoyvík og Kollafirði verða skúlastovur tøkar á Eysturskúlanum, sum gevur møguleikar at víðka og menna samstarvið í 10. flokkunum. Næmingarnir úr Hoyvík, Kaldbak og Kollafirði fara at ganga í 10. flokki á Eysturskúlanum, men talan kann eisini verða um at víðka samstarvið at fevna um aðrar skúlar.

Í skrivi, dagfest 6. apríl 2004, frá Mentamálaráðnum til Tórshavnar kommunu um 10. flokk sigur Mentamálaráðið m.a.

"Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlans, ið skrivaði Álit um nýggja fólkaskúlalóg í 1997, sum er grundarlagið undir verandi fólkaskúlalóg, hevur m.a. víst á, at tað hevði helst verið best, um teir uml. 600 næmingarnir í 10. flokkunum í Føroyum høvdu verið savnaði í ein ella tveir fólkaskúlar, tí bert á tann hátt hevði tann

einstaki næmingurin í størst møguligan mun fingið síni lærugreinaynski uppfylt. Ætlanin við at 10. flokkur skuldi verða heilt valfríur, var júst tann, at tann einstaki næmingurin skuldi í nógv størri mun enn áður kunna seta sína egnu útbúgving saman. Skal hetta eydnast er neyðugt við stórum skúlaeindum, antin sum skúlasamstarv ella við at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í einum stórum skúla."

Byggideildin hevur kannað, hvat meirkostnaðurin verður, um ynski er at taka tríggjar 10. flokkar við í verkætlanina.

Sambært teimum fortreytum, sum higartil eru nýttar at meta um kostnaðar-karmin, sær ein øking soleiðis út sambært arkitektavirkinum Árni Winther:

Øking av víddini: 75 næm. * 11 m² pr. næm. = 825 m²

Meirkostnaður: 825 m² * 18.000 pr. m² = 14.85 mill. kr.
Vit gera vart við, at hesin kostnaður má metast sum ein grundíløga til at hýsa 75 næmingum afturat. Vit hava ikki kannað serstøk krøv til 10. flokkar, heldur ikki hava vit verið í samband við arbeiðsbólkin hjá byggiharranum hesum viðvíkjandi.

Um ein so stór øking/broyting í verkætlanini skal gjøgnumførast, er sjálvsagt, at vit eiga at endurskoða skipanaruppskotið frá mai 2004.

Í skúlaárinum 2004/2005 eru 186 næmingar í 10. fl. Tað eru 26 næmingar (ein fl.) færri enn síðsta skúlaár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at halda fram við upprunaligu ætlanunum at byggja nýggjan 2-sporaðan skúla við Løgmannabreyt til 1.–9. flokk og frítíðarskúla til 1. og 2. flokk vísandi til:

- at fólkaskúlalógin frá 1997 mælir til størri skúlaeindir í 10. flokkunum, sum mentamálaráðið eisini mælir til.
- at skúlastovur verða tøkar í Eysturskúlanum, tá ið næmingarnir í 8. og 9. flokki í Hoyvík og í Kollafirði í framtíðini ikki koma at ganga har.
- at meirkostnaðurin verður umleið 15 mill. kr. um 10. flokkur verður við verkætlanini.
- at neyðugt verður at endurskoða alt skúlaprojektið, sum aftur fer at hava við sær, at verkætlanin dregur út.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. oktober 2004:** Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur undir við byggiætlanini, men mælir til, at pláss eisini verður fyri 10. flokki.

Fyrst var atkvøtt um minnilutatilmæli hjá Høgna Mikkelsen sum fall við 1 atkvøðum fyri og 10 atkvøðum ímóti. Fyri atkvøddi Høgni Mikkelsen. Ímóti atkvøddu Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup S. Joensen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen. Bjarti Mohr greiddi ikki atkvøðu.

Síðani var atkvøtt um tilmæli hjá Mentamálanevndini tann 30. juni 2004 sum var einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Árni Winther, arkitektur og Palli Henriksen, samskipari, kunnaðu um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um kostnaðin av skúlanum

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Bygginevndin kunnaði um kostnaðarmetingina, og hvussu langt arbeiðið er komið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggibúna økið var boðið út í innbodnari lisitatión millum 5 fyritøkur. 4 fyritøkur valdu at geva tilboð.

Tilboðini eru (uttan mvg):

| | |
|---|---|
| Articon | kr. 8.656.258,00 |
| H.V. Lútzen P/F | kr. 8.710.130,00 |
| P/F J. & K. Petersen | kr. 7.862.666,35 |
| Samtakið TH & ZRJ | kr. 7.067.578,00 |

Árni Winther, arkitektar, hava saman við Landsbyggifelagnum og Sofus M. Jacobsen kannað og eftirroknað tilboðini. Hesir meta samlaðu tilboðshæddina sum lága, men forsvarliga. Kostnaðarmetingin segði kr. 7.885.160,00.

Til kunningar verður sagt frá, at bygginevndin hevur samtykt at bjóða arbeiðið við skúlan út í tveimum umførum afturat: Rábygningur fyri seg og liðugtgeran fyri seg. Hetta verður gjørt fyri at fáa skúlan lidnan til tíðina, t.v.s., at projekteringin kann halda fram, sjálvt um spakin er settur í.

**Tilmæli**
Bygginevndin mælir til at taka av lægsta tilboði áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játtað kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25%.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Miðfyrisitingarstjórin var á fundinum og greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at taka undir til tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini um at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 7.067.578,00 frá Samtakinum TH (Tórhallur Hansen) & ZRJ (Zacharias R. Jacobsen) og játta kr. 8.500.000,00 til arbeiðið, íroknað ókent 10%, byggileiðsla, eftirlit og mvg 6,25% og beina málið í býráðið.

Nevndin harmast um at røtt mannagongd ikki er brúkt.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti**

Vísandi til at verkætlanin at byggja nýggjan skúla við Løgmannabreyt, hevur verið boðin út millum fimm arbeiðstakarar at geva tilboð uppá, hevur bygginevndin at verkætlanini, havt samskifti við allar tilboðsgevararnar. Víðari hava umboð fyri bygginevndina og tekniski stjórin havt fundir við lægsta tilboðsgevaran fyri at kanna tilboðið nærri. Eisini hava ivamál frá báðum pørtum verið umrødd, og útgreinaði. Vísandi til hjálagda notat, ið er niðurstøðan hjá umboðunum hjá TK, j. Nr. 2004-0214/ dagfest Tórshavn 23. febr. 2007, mælir bygginevndin býráðnum, umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina, til at fara í samráðingar um endaligan sáttmála við Búsetur um tilboð B, longra byggitíðin uppá 30 mðr., áljóðandi kr. 98.271.956, uttan mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.

**Mentamálanevndin 7. mars 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 21. mars 2007:** Tekniski stjórin, býararkitekturin og bygginevndin kunnaðu mentamálanevndina um málið.

**Tilmæli frá bygginevndini:**
Bjørgfríð Ludvig, Jógvan Arge og Jan Christiansen mæla til at halda fast við síðstnevnda ískoyti, tó soleiðis at fyrivarni hjá Føroya Handverksmeistarafelag kann kapitaliserast.

Mikael H. Viderø, Ingibjørg Berg og Høgni Joensen mæla til at annulera lisitatiónina og bjóða arbeiðið út av nýggjum, har skúlin við Løgmannabreyt og Argja skúli verða boðin út saman í partalag.

**Mentamálanevndin 26. mars 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við at fara í samráðingar um endaligan sáttmála við Búsetur um tilboð B, tó soleiðis at fyrivarni nr. 8 hjá Føroya Handverksmeistarafelag kann kapitaliserast.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Útsett.

**Ískoyti**

Eftir fleiri samráðingarfundir millum kommununa og Sp/f Búsetur kann staðfestast, at grundarlag var ikki fyri at koma til eina semju um kapitalisering av fyrivarni nr. 8. Tórshavnar kommuna hevur síðani bjóða sær til at gera semju grunda á upprunaliga tilboði hjá Búsetur. Men heldur ikki tað hevur borið á mál, og á fundi hin 28. mars 2007 hevur Sp/f Búsetur boða borgarstjóranum frá, at teir ikki meta at møguligt er at koma til eina semju um ein sáttmála, og eru samráðingarnar sostatt endaðar úrslitaleysar.

Sostatt er talan um eina nýggja støðu.

Eftir samrøðu við tekniska stjóran mælir borgarstjórin til fyrst at annulerað útbjóðingina. Harnæst verður mælt til, at víðka um arbeiði við at gera vendipláss og busslummar á Løgmannabreyt til avseting av skúlabørnum v.m. og at gera ætlaða sparkivøllin sunnanfyri skúlan eisini, og at bjóða hetta út sum eitt samlað arbeiði í tveimum stigum, soleiðis at fyrsta stigi fevnir um eina prækvalifisering og næsta stigi fevnir um eina innbodna lisitatión millum teir tilboðsgevarar sum verða kvalifiseraðir, og at beina málið í mentamálanevndina, teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina til avgreiðslu.

**Býráðið 28. mars 2007:** Samtykt at viðgera mál nr. 42/07 sum seinasta mál, aftaná mál nr. 49.

Kl.20:20 bleiv fundurin niðurlagdur.

Kl. 20:24 fundur uppafturtikin.

Samtykt uttan atkvøðugreiðslu, at taka undir við tilmæli frá Leivur Hansen til býráðið um, at heita á borgarstjóran at halda ein fund afturat við Sp/f Búsetur, í eini roynd at finna eina semju í málinum, og at bygginevndin verður við á fundi.

**Mentamálanevndin: 23. apríl 2007:** Borgarstjórin greiddi frá, at hann eftir býráðsfundin 28. mars 2007, hevði fingið skriv frá Sp/f Búsetur, sum greiðir frá, at metingin, hann hevði havt av at samráðingarnar vóru endaðar úrslitaleyst, var grundað á misskiljing millum partarnar, og at samráðingar tískil framhaldandi eru millum partarnar.

Borgarstjórin og formaðurin í bygginevndini greiddu frá gongdini í málinum. Tekniski stjórin gjøgnumgekk sáttmálauppskot, dagfest 23. apríl 2007, og greiddi frá síni støðu til málið.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2007:** Tekniski stjórin gjøgnumgekk sáttmálauppskot, dagfest 23. apríl 2007, og greiddi frá síni støðu til málið.

**Býráðið 23. apríl 2007:** Marin Katrina Frýdal og Hildur Eyðunsdóttir, vísa til tilmælið frá borgarstjóranum til býráðið tann 28. mars 2007 og mæla til, at taka undir við hansara tilmæli um at annulera útbjóðingina v.m., ið fall við 4 atkvøðum fyri og 8 ímóti

Fyri atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Annika Olsen

Við støði í býráðssamtyktini 28. mars 2007, mælir borgarstjórin til at gera sáttmála og ískoytissáttmála nr. 1 við Sp/f Búsetur um bygging av skúla við Løgmannabreyt fyri tilsamans 107.456.475,00 kr. uttan mvg. Tilmælið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Útsett.

**Uppískoyti:**
Játtaðar higartil eru 8,6 mió kr. til jørðarbeiði. Harafturat hevur býráðið samtykt at taka av tilboði uppá kr. 107.456.475,00 til høvuðsarbeiðstøkuna.

Afturat hesum kemur:

| | | |
|---|---|---|
| 1) Projekt, eftirlit og byggileiðsla | kr. | 12.353.846 |
| 2) Eykaðarbeiðir (-kend og ókend) og prísvøkstur, -mett | kr. | 14.485.855 |
| 3) Innbúgv íroknað tannlæknaserútgerð, -mett | kr. | 11.500.000 |
| 4) List og prýi (~1,5% av byggikostnaði) | kr. | 1.717.861 |
| 5) Jørð og íbindingargjøld, -fyribils | kr. | 4.995.965 |
| Samlað | kr. | 45.053.527 |
| Bygging (Jørðarbeiði og høvuðsarbeiðstøka) | kr. | 115.456.475 |
| Íalt fyri verkætlanina | kr. | 160.501.002 |

*-Neyvari útgreining verður framløgd á fundinum.*

Samlaða upphæddin fyri verkætlanina kemur sostatt uppá 160,5 mió.kr., og er fyriløgd bygginevndini t. 8. nov.´07.

Metingin og játtanin t. 30.juni 2004 byggir bert á byggikostnað íroknað projektering. Skulu tølini frá 2004 samanberast við innkomnu tilboðini íroknað projekt, eru samsvarandi upphæddir øktar úr 102 til 115 mió.kr. t.v.s. ein øking á góð 12%. Hesin meirkostnaður er orsakað av hækkaðum kostnaðarstøði í millumliggjandi trimum árunum, umframt ta fermetra øking ið er ískoytt niðanfyri.

Tað verður viðmerkt, at hædd ikki er tikin fyri eykaðarbeiði, 14,5 mió.kr. í samanberingini. Orsøkin er, at henda óvissa eisini var galdandi tá upprunaliga mett var um kostnað.

**Ískoyti:**
Vegna seinni tilkomin krøv og ynskir frá m.a. Mentamálaráðnum, Brunaumsjón Landsins, krøv til frítíðarskúlan og tænastudepil, umframt goymslur er víddin á skúlanum nú 6.200 fermetrar mótvegis 5.675 fermetrar í skipanaruppskotinum frá 2004, tó verður øll økingin ikki fult komplettera í fyrsta umfari, -men fyrireika er at ganga framtíðar krøvum á møti.

**Skúlin við Løgmannabreyt**

FÍGGJARTØRVUR juni 2007-2009

*Rev. Nov.´07*

| **Skúlin við Løgmannabreyt: konto 1033-33010**<br>Fíggjartørvur 2007-2009 | ~brúkt higartil<br>1.000. kr. | 2007 rest<br>1.000. kr. | 2008<br>1.000. kr. | 2009<br>1.000. kr. | SUM<br>1.000. kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Bygging smbr. sáttmála, íroknað príshækkan 2,5% p.a. | 6.878 | 21.835 | 64.646 | 23.416 | 116.774 |
| Eykaðveitingar, kendar og ókendar, + 2,1 mió.kr. frá byggibúnan | 0 | 1.698 | 6.541 | 3.495 | 11.735 |
| Innbúgv, serútgerð tannlækni, list og serfyriskipan | 0 | 0 | 7.018 | 6.700 | 13.718 |
| Projekt, rest íroknað eftirlit og byggileiðslu | 8.354 | 1.065 | 2.482 | 1.387 | 13.287 |
| Jarðarkeyp og íbindingargjøld | | 4.996 | | | 4.996 |
| Árligur tørvur | 15.231 | 29.595 | 80.687 | 34.998 | 160.510 |

*GG: -alllar upphæddir eru uttan MVG*

**Tilmæli:**
Mettur kostnaður fyri skúlan við Løgmannabreyt verður kr. 160.510.000,- umframt meirvirðisgjald.

Býráðið hevur higartil játtað kr. 8,1 mió uttan mvg, og tikið av sáttmálum afturat hesum fyri kr. 107.456.475 uttan mvg. Haraftrat verður roknað við 45.053.527 kr. til projekt, eftirlit, byggileiðslu, eykaarbeiðir, innbúgv, list, prýði, jørð og íbindingargjøld.

Bygginevndin mælir mentamálanevndini til at játta kr. 152.410.002 uttan mvg (107.456.475+45.053.527 kr) til byggingina og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Mentamálanevndin 14. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. november 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 161.623.000 íroknað mvg sambært yvirliti yvir fíggjartørv, dagfest nov. 2007, av konto fyri íløgum.

**Býráðið 22. november 2007:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti: Broytingar í byggingini.**

Mentamálaráðið hevur ásett, at lærarastørvini á skúlanum skulu skipast sum dagsverk, og krøv eru tí sett til arbeiðsumstøðurnar hjá lærarunum í hesum sambandi. Hetta merkir, at pláss skal vera fyri, at allir lærarar skulu hava hølir til at arbeiða á skúlanum frá 8-16.

Hetta kravið var ikki við í projekteringini av skúlanum og tí heldur ikki við í kostnaðarmetingini, sum býráðið samtykti.

Tað vóru tó eyka hølir í skúlanum, sum vóru ætlað til goymslu. Bygginevndin tók avgerð um at seta vindeygur, hurðar og yvirljós í hesi hølir, soleiðis at møguleiki varð fyri at innrætta hølini til arbeiðsrúm hjá lærarum. Hølini eru trý í tali.

Mett verður, at meirkostnaðurin fyri at komplettera øll 3 arbeiðsrúmini, er kr. 1,3 mió., - uttan projektering.

Við tað, at hetta kravið ikki er við í kostnaðarmetingini av skúlanum, er neyðugt at finna sparingar.

Møguleiki er fyri at útseta/spara serútgerð til tannlækna, tað er stólar, røntgen v.m. Mett virði kr. 1,4 mió.kr. Hetta ber í sær, at skúlatannlækni ikki kann virka á skúlanum, men børnini kunnu busta tenn o.a. í skúlanum eins og í hinum skúlunum.

Við hesum verða umleið 1,4 mió. kr. spardar. Gjørt verður vart við, at onnur krøv eisini er komin eftir, at kostnaðarmetingin varð gjørd, sum bygginevndin arbeiðir við.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin fyri mentamáladeildina og bygginevndin mælir til at útseta/spara serútgerð til tannlækna, og komplettera trý arbeiðsrúm til dagsverk hjá lærarum.

**Mentamálanevndin 1. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**86/09** **<u>2009-0542</u>**

**<u>Uppskot um býarhús</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Eftir áheitan frá borgarstjóranum og formanninum í byggi-& býarskipanarnevndini, hevur umsitingin kannað møguleikarnar fyri at ríva niður

gomlu bilhúsini hjá TK á matr, nr. 296 c, og á staðnum byggja ein bygning til mentunarlig endamál, eitt sokallað býarhús.

Fyri árum síðan tók býráðið, í samtykt, avgerð um at tilnevna Tórsgøtu at vera mentunargøtu. Síðan tá, hevur miðvíst verið arbeitt við at røkka hesum. Nevnast kann, at í dag húsast Tjóðpallur Føroya, ungdómstilhaldsstaðið Margarinfabrikkin, Miðlahúsið, matstøð, dansistøð øll í gøtuni. Og sum tað seinasta er Reinsaríið við at festa røtur sum eitt ískoyti til mentunartilboðini.

Verkætlanin um eitt slíkt býarhús, er hugsað sum eitt ískoyti til verandi funktiónir, og vil við sínari staðseting og funktión leggjast aftrat tankanum um mentunargøtu bæði í sínum innirúmi, men eisini sum karmur um eitt pláss millum bygningar sum vil gerast eitt býarrúm við ríkum møguleikum.

Býararkitekturin kunnar um innleiðandi tankar undir verkætlanina á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin tekur støðu til um farast skal víðari við verkætlanini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. februar 2009:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at tekniska fyrisiting og trivnaðarfyrisitingin í felag arbeiða víðari við verkætlanini og at hon verður framd við atliti til verkætlanina um Reinsaríið, mál. nr. 2005-1183.

**Mentamálanevndin 1. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í mentamálanevndini 1. apríl 2009, hevur umsitingin gjørt eina kostnaðarmeting av bygging av einum býarhúsi í Tórsgøtu. Somuleiðis hevur umsitingin gjørt uppskot til virkisøkið hjá einum slíkum húsi.

Við atliti at staðseting og umhvørvi, sum eitt slíkt hús kemur at virka í, kann umhugsast, um ikki virkisøkið hjá húsinum júst eigur at fevna so víða, sum til ber. Við hesum meinast, at eitt slíkt hús kann hugsast sum eitt alment býarrúm, har húsið sjálvt ikki er annað enn karmur um einahvørja mentanarliga nýtslu.

Tilfarsval og skipanin av bygninginum eru miðvíst hugsað at stuðla undir virkisøkið fyri húsið, soleiðis at tilfarið, sum nýtt verður, tolir nógva nýtslu og slit og leggur upp til hetta. Einfalda skipanin av húsinum ger, at húsið er lætt at umsita hjá brúkarum, og hon leggur ongar bindingar á slag av nýtslu, við tað at rúmini eru rein og einføld.

Skotið verður upp, at einasta treytin fyri nýtslu er, at talan er um mentanarligt virksemi. Orsøkin er, at kommunan vil tryggja sær, at nýtslan ikki verður í andsøgn við yvirlýsingina fyri Tórsgøtu sum mentanargøtu.

Umhugsast kann, um umsitingin av húsinum møguliga eigur at liggja saman við Margarinfabrikkini og framtíðar umsiting av Reinsarínum. Á henda hátt kundu umsiting og rakstur verið gjørd dynamisk og samskipandi, bæði fyri smærri tiltøk í einum av bygningunum, men eisini við møguleika at hýsa størri tiltøkum, sum fevna um øll trý støðini.
Ein reglugerð fyri húsið eigur tískil at verða tilevnað samtíðis við byggingina.

Fyri at tryggja húsinum rætta samleikan verður somuleiðis mett, at neyðugt er at geva húsinum navn skjótast til ber, soleiðis at ”brandingin” av húsinum fær tíð at arbeiða.

Byggingin:
Talan er um ein bygning, sum er 9,5 x 14,5 metrar, uml. 137 m2. Bygningurin er 6 metrar høgur, so at innskotin hædd er uppá 3 x 14,5 metrar, uml. 43,5 m2.
Bygningurin er hugsaður úr betongveggjum, stálkonstruktión og glasfasadum.
Umframt uppihaldsøkir eru borðreiðingarrúm, 2 goymsluhølir, og 2 WC-kjarnar.

## Kostnaðarmeting fyri bygging:

| | |
|---|---:|
| Niðurtøka av verandi: | 45.000 |
| Fundamentir: | 120.000 |
| Lendisgólv við bjálving og glittað: | 77.625 |
| Betongelementir liðugt uppsett | 360.000 |
| Betongdekk við pusslag | 49.450 |
| Stálkonstruktión liðugt uppsett | 275.000 |
| Takkonstruktión | 175.500 |
| Glasfasada | 300.000 |
| Rekkverk á innskotna hædd | 35.000 |
| Trappa | 45.000 |
| WC 4 stk. | 65.600 |
| HVS og kloakk | 184.000 |
| EL | 120.000 |
| **Tilsamans** | **1.852.175** |
| Óvæntað og ráðgeving 10% | 185.217,50 |
| **Tilsamans** | **2.037.392,50** |

**Tilsamans við 6,25% mvg.** **2.164.729,50**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2.164.729,50 av íløgum fyri mentan og frítíð 2009, og at húsið verður kallað PERLAN.

**Mentamálanevndin 20. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**87/09** **2004-0660**

**Lendisarbeiði og fríðkan av uttanumøki við Tjarnargarð.**

Á býráðsfundi tann 23. juni 2005 vóru játtaðar kr. 1.232.000 til lendisarbeiði og fríðkan av økinum við Tjarnargarð.

Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari licitatión , og komu inn 4 tilboð. Licitatión varð hildin 30. mars 2009 og varð úrslitið:

| Tilboðsupphædd | | Mvg 6,25% | Íalt við 6,25% Mvg |
|---|---|---|---|
| P/F Hjálpirót | 1.302.727,00 | 81.420,44 | 1.384.147,44 |
| P/F Articon | 1.448.488,52 | 90.530,53 | 1.539.019,05 |
| P/F við Sjógv | 1.498.319,70 | 93.644,98 | 1.591.964,68 |
| P/F Annlegs-gartnaravirkið | 2.248.050,00 | 140.503,13 | 2.388.553,13 |

Ráðgevin Selmar Nielsen Arkitektur S/pf hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum.

Við 10% til óvæntaðar útreiðslur og 16% til projektering og eftirlit verður samlaði kostnaðurin 1.384.174 + 138.417 + 243.615 ella kr. 1.766.206...

Um kostnaðurin skal verða innanfyri játtaða fíggjarkarmin, verður neyðugt at minka projektið.

Ráðgevin hevur gjørt uppskot til sparingar í projektinum uppá tilsamans kr. 405.060,-.

Eftir skerda uppskotinum verður samlaði kostnaðurin við 10% til óvæntað og 16% til projektering og eftirlit 953.771 + 95.377 + 167.864 ella til samans kr. 1.217.012

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá P/F Hjálpirót við teimum skerjingum, sum ráðgevin hevur skotið upp.

**Sosiala nevnd 20. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

- Nú kom Levi Mørk.

**88/09** **2001-1314**

**Skarðshjalli - útstykkingarætlan**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
HMP-Consult hevur gjørt forprojekt, sum fatar um 23 vinnustykki úr 2010 m² upp í 3900 m² á Skarðshjalla.

Í forprojektinum eru eisini dømi um longdarskurð og tvørskurð í vegi. Byggi- og býarskipanardeildin metir, at forprojektið lýkur treytirnar, ið vóru settar tí projekterandi, og metir tí, at projekteringin eigur at halda fram eftir sama leisti sum higartil. Eisini vísir projektið, at arbeiðið kann gerast í trimum byggistigum við ávikavist 7,9 og 7 stykkjum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at forprojektið verður góðkent, og at HMP-Consult fær boð um at halda fram við projekteringini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. februar 2002:** Samtykt at góðkenna ætlanina, tó soleiðis at tey størstu stykkini verða gjørd minni, soleiðis at fleiri stykki fáast burturúr, og at fleiri stykki verða áleið 2000 m².

**Ískoyti:**
Projektið, ið HMP Consult hevur gjørt, er nú klárt at bjóða út. Í tí ambandi er neyðugt, at kommunan ognar sær økið, ið er umleið 170.000 m² til støddar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at fíggjarnevndin samtykkir at seta av pening til keyp av øki á Skarðshjalla, víst á tekning, dagfest 25. januar 2002.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2002:** Samtykt at mæla býráðnum til at kommunan ognar sær økið.

**Býráðið 20. juni 2002:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanini hjá Landsverksfrøðinginum at broyta linjuføringina á ytra Ringvegi at verða ímillum á Hjalla og Skarðshjalla hevur verið neyðugt at broyta atkomuviðurskiftini til nýggju útstykkingina. Broytta projektið verður framlagt á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna broytta projektið og at arbeiðið verður boðið út.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. oktober 2002:** Útsett

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. november 2002:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum.

**Keyp av øki á Skarðshjalla til ídnaðarøki.**

Jarðarráðið hevur í skrivi, dagfest 29. mars 2003, sent býráðnum hesar viðmerkingar frá festaranum:

"Um so er at Føroya jarðarráð letur kommununi vinnustykki á Skarðshjalla, vil undirritaði treytað sær, at seyðasmoga verður gjørd á Kallnesskarði til seyð og neyt at rása ígjøgnum. Øll mold, ið ikki má nýtast aftur á staðnum, verður koyrd niðan á Vatnskarðar og slætta út til at gera til bø, um festarin ynskir tað."

Biðið verður um býráðsins viðmerkingar.

**Fíggjarnevndin 3. apríl 2003:** Samtykt at mæla býráðnum til at kommunan ognar sær lendið fyri kr. 45,00 pr. $m^2$ umframt kr. 3,50 pr. $m^2$ fyri vetrarbit og við teimum treytum sum festarin setir.

**Býráðið 10. apríl 2003:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**<u>Vinnustykki á Skarðshjalla – 1. byggistig</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í samband við ústykkingina til vinnustykki inni á Skarðshjalla, hevur arbeiðstakarin rent seg í eina royðulind, og hevur hetta við sær ein meirkostnað fri byggibúningina.

Ráðgevin HMP-Consult hevur gjørt eina meting í málinum og hevur sent umsitingini tilmæli, sum er grundað á, at royðan ikki er hóskandi tilfar sum fyllu í sjálvum sær, men er tó fyri ein part blandaður við grótfylluna fyri at sleppa undan at koyra alt burtur. Tilmæli er soljóðandi:

"Ein nýggj meting av royðu og nøgdum á Skarðshjalla er gjørd.

Av tí at meira er sprongt enn ætlað við at spreingja vinnuøkini plant v.m., verður mett at nokk av gróti er á Skarðshjalla og tí verður ikki neyðugt at flyta grót til økið.

Neyðugt verður tó at koyra eini 3000 m³ av royðugróti niðan í Húsahagan, og kemur hetta at kosta um 270.000 kr. u/mvg.

Meira er sprongt enn ætlað, hetta er mett til at vera um 6000 m³ og kemur at kosta um 250.000 kr. u/mvg.

Meira av mold er eisini flutt niðan í Húsahagan, mett til um 3500 m³ og kemur at kosta um 180.000 kr. u/mvg.

HMP hevur ikki fingið allar uppmátingar frá Munin enn."

Hetta merkir, at ein meirkostnaður uppá 700.000 kr.
Útstykkingin er uppá fyribils 7 út av samlað 28 stykkjum.
Hetta merkir, at tey 7 stykkini, ið eru uml. 17.350 m² tilsamans skulu bera ein meirkostnað uppá 100.000 kr/pr. stykkið - ella (700.000 kr/ 17.350 m²) uml. 40 kr/m².

Hjálagt er støðumynd, ið lýsir samlaðu útstykkingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at játta neyðugu peningin at gera byggibúningina, so at kommunan kann selja stykkini og fáa pengarnar inn aftur.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**<u>Ásetan av prísi fyri vinnustykki á Skarðshjalla</u>.**

Tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at áseta søluprísin til kr. 545,63 umframt keypsprís fyri alt lendið lutað á samlaðu víddina á grundstykkjunum.

**Ískoyti:**
1. byggistig er avhendað og arbeitt verður í løtuni við at selja stykkini.

Vísandi til bíðilistan hjá TK upp á vinnustykkir, mælir býararkitekturin til at farið verður undir víðari útstykking inni á Skarðshjalla.

Hjálagt er kort sum vísir samlaða útstykkingarætlanina. J. nr. 200101314, dagfest 19. 09.2005.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin samtykkir at lata gera projektering av næsta stig av samlaða útstykkingarætlanini, sambært mannagongd hjá TK um ger av verkætlanum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Nevndin samtykti eisini at møguleiki skal verða fyri smærri stykkjum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at TK arbeiðir við at selja stykkini, sum vóru í 1. stig, hevur samskiftið við møguligar keyparar víst, at ynskiligt er at luta gjørdu stykkini sundur í minni eindir.

Hesum hevur umsitingin roynt at gingið á møti, í stóran mun, og nýggj útstykkingarskipan er fingin til vega.

Ásannnandi at broytingar í liðugt gjørda verkætlan, nærum altíð hava avleiðingar við sær, metir býararkitekturin at allar broytingar í sambandi við tekniskar leiðingar v.m. bert eiga at verða framdar, eftir ávísing av, og í tøttum samstarvi við teknisku deild.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin góðtekur nýggju ústykkingarskipanina, og at nevndin beinir málið í tekninsku nevnd at gera viðmerkingar til fíggjarnevndina og býráðið í sambandi við treytir fyri sølu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Umsitining hevur, grundað á umsóknir frá umsøkjarum til vinnustykkir, arbeitt við at tillaga víðari útstykkingina av vinnustykkjunum inni á Skarðshjalla, byggistigini 2 og 3, sum hóskandi til umsøkjararnar á bíðilistanum hjá TK.

**Tilmæli:**
Býarrkitekurin mælir til at nevndin góðkennir nýggja uppskotið til útstykking fyri byggistigini 2 og 3 á Skarðshjalla, soleiðis at arbeiðast kann við at projektera og bjóða út vegagerðina, og partar av vinnustykkinum, meðan farast kann undir at selja aðrar partar til størri vinnustykkir sum óbyggibúnaðið stykkir. Hjálagt er kortskjal, dagfest 02.10.2006 j.nr 2001-1314**.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. oktober 2006:** Nevndin samtykti at biðja um frágreiðing frá umsitingini av keyp og sølu.

**Byggi og býarskipanarevndin 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum til fundin 2. oktober og biðja um eina ætlan fyri nýtslu av stykkjunum við tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Vísandi til, at 1. byggistig er liðugtgjørt, og at søla av øllum stykkjunum er komin uppá pláss, mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til at nevndin góðkennir matrikuleringætlanina fyri 1. byggistig sambært kortskjal dagfest 30.10.2006, jr.nr 2001-1314.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Í sambandi við útstykkingina á Skarðshjalla, má kommunan keypa 375 m² frá Búnaðarstovuni.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa 375 m² fyri vanligan jarðarprís.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Tekniska umsitingin hevur latið gera tekniskt prosjekt. Tekniska umsitingin hevur eisini luttikið á nøkrum fundum millum umsitingina fyri keyp og sølu og keypararnar av teimum báðum stóru stykkjunum.

Í sambandi við prosjekteringina og samskifti við ráðgevan um arbeiði, viðgjørdi tekniska umsitingin – t.e. byggideildin og tekniska deild – teknisku viðurskiftini í málinum.

Niðurstøðan var, at tekniska umsitingin metti, at alt økið skuldi gravast av, spreingjast, planerast og kloakkerast beinanvegin, soleiðis at teir, sum skulu byggja ella hava bygt í økinum, verða ikki nervaðir av spreingi- og grevstararbeiði

í fleiri ár frameftir, eftir at bygningar eru komnir upp at standa har inni (skjal 2001-1314/98).

Á fundum við teir báðar stóru keypararnar ynsktu teir at vita prísin fyri grundstykkini, um tey vóru gjørd byggibúgvin av kommununi. Á hesum grundarlagið var biðið um undirhondsboð frá tveimum teimum størstu annleggsentreprenørunum í Føroyum, Articon og J & K. Petersen.

| **Bjóðandi** | **Tilboðsupphædd (u. mvg)** | **Alternativt tilboð (u. mvg)** |
|---|---|---|
| Articon | 36.464.810,- | 29.948.891,- |
| J & K Petersen | 30.456.917,- | 28.820.948,- |
| Meting | 37.100.000,- | |

Lægsta tilboðið er munandi lægri enn metingin.

Viðv. meting av tilboðunum, og hvørja støðu tekniska umsitingin hevur viðv. hvussu arbeiði skal skipast, verður víst til notat í málinum (2001-1314/103).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

1. at leggja málið fyri byggi- og býarskipanarnevndina og fyri teknisku nevnd til viðgerðar
2. at stovna verður eigarafelag fyri økið, sum skal standa sum arbeiðsánari
3. at kommunan vegna eigarafelagið tekur av lægsta tilboðnum frá J & K Petersen og at byggibúningararbeiðið verður gjørt av einum av hesum tilboðsgevara
4. at fráboða øllum keyparunum um hesa avgerð og at senda teimum útkast til fyribils skeyti við prísi við fráboðan um, at teir verða bidnir um beinanvegin skrivliga at melda aftur um teir takað av ella ikki
5. at fáa møgulig broytingarynski viðv. kotum o.l. frá keyparum beinanvegin, soleiðis at arbeiðið kann lagast hareftir í tann mun tað ber til.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. august 2007:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Bjarti Mohr, samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Leivur Hansen, tekur støðu í fíggjarnevndini.

**Tekniska nevnd 28. august 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tekniska projektinum sambært tekningsyvirlitum skjal nr. 2007-2044/11 og 2007-2044/12.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at halda seg til samtyktina frá byggi- og býarskipanarnevndini 30. oktober 2006 og vísir til notat/teldubræv j. nr. 2006-0183/5, og at kommunan heldur seg til gjørdar avtalur við keyparar av vinnustykkjum.

Umboð fyri kommununa hava í longri tíð samskift við keypararnar av størru vinnustykkjunum í byggistiginum 2 og 3 á Skarðshjalla við støði í samtyktini hjá byggi- og býarskipanarnevndini, ið heimilar sølu av hesum sum óbyggibúnaði stykki.

Nú komið er á mál, hálsar tekniska umsitingin um í lýsing av málinum og leggur málið fyri byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd til viðgerðar.

**Fíggjarnevndin 29. august 2007:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 5. september 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Leivur Hansen, mælir býráðnum til:

1. at kommunan tekur av lægsta tilboðnum frá J & K Petersen og at byggibúningararbeiðið verður gjørt í einum av hesum tilboðsgevara
2. at fráboða øllum keyparunum um hesa avgerð og at senda teimum útkast til fyribils skeyti við prísi við fráboðan um, at teir verða bidnir um beinanvegin skrivliga at melda aftur um teir takað av ella ikki
3. at fáa møgulig broytingarynski viðv. kotum o.l. frá keyparum beinanvegin, soleiðis at arbeiðið kann lagast hareftir í tann mun tað ber til.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, vísir til gongdina í málinum og at selja pørtum størri vinnustykkir sum óbyggibúgvin.

**Býráðið 13. september 2007:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 27. september 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 27. september 2007:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 3. oktober 2007:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2007:** Meirilutin, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til, at taka undir við meirilutatilmælinum frá fíggjarnevndini 5. september 2007.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, vísir á, at nýggjar upplýsingar eru í málinum, og mælir tí býráðnum til, at kommunan ger vegin og at keypararnir sjálvir byggibúna grundstykkini eftir einum leisti og eini tíðarfreist, sum kommunan setur.

**Býráðið 13. desember 2007:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Av tí at umsøkjarnir til tey tvey stóru stykkini hava tikið seg aftur, verður neyðugt at umskipa útstykkingina til smærri stykkir og er tí eisini neyðugt at tillaga ætlaðu vegagerðina við installatiónum, so sum kloakk, fjarhita, vatn v.m. til at tæna fleiri stykkjum.

Bygginevndini fyri Vinnuøkið á Skarðshjalla 2. stig. samtyktina á fundi 17. apríl 2009 at mæla til at minka sáttmálabundna arbeiðið við teimum fimtan prosentum, sum sáttmálin loyvir við m.a. at taka vegagerðina v. m. burtur úr arbeiðinum.

Í samsvari við nevndu samtykt hjá bygginevndini fyri vinnuøkið á Skarðshjalla 2. stig, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at taka vegagerðina, fínplanering v.m. (sí j. nr. 2008-3500/8) fyri kr. 4.568.537,55, sum sáttmálin loyvir, burturúr arbeiðinum, svarandi til fimtan prosent av sáttmála upphæddini uppá kr.30.456.917,-.

Eisini mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at játta kr. 3.319.180 soleiðis at samlaði fíggjarkarmurin uppá kr. 35.679.654,- íroknа mvg (sí j. nr. 2007-2044/57) fyri verkætlanina verður játtaður, har prosjektering, byggileiðsla, kendar meirveitingar og óvæntað er íroknað.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum frá bygginevndini, tekniska stjóranum og býarverkfrøðingum.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**89/09** <u>**2009-1078**</u>

<u>**Uppskot til lýsing eftir kommunustjóri**</u>

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Grannskoðaravirkið Spekt ger uppskot til lýsing.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 30. apríl 2009:** Fíggjarnevndin biður um nýtt uppskot til lýsing og nýtt uppskot til starvsprofil at leggja fyri fíggjarnevndina á eykafundi.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Tikið av skrá.

**90/09** <u>**2005-2044**</u>

<u>**Ruskinnsavning eftir 2006**</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Advokatskrivstovan (Óla Jákup Kristoffersen) hevur vegna Sp/F Tom Hellisdal sent skriv til kommununa, stílað til heilsu- og umhvørvisnevndina (j.nr. 2005-2044/29), har ið biðið verður um at fáa boð um, hvørt kommunan er sinnað at leingja sáttmálan við Sp/F Tom Hellisdal í upp til eitt sjey ára skeið.

Í brævinum, verður greitt frá, at felagið hevur munandi størri rakstrarútreiðslur, íroknað rentuútreiðslur, enn roknað varð við, tá sáttmálin varð gjørdur. Tí hevur felagið eitt gjaldførishall, sum í fyrsta lagi merkir, at felagið ikki kann gjalda eins nógv í rentum og avdráttum til bankan sum upprunaliga avtalað. Bankin hevur gjørt vart við hetta og ynskir fund við felagið og ynskir at frætta nærri um útlitini fyri nýggjum nøktandi sáttmála við kommununa.
Felagið er tí komið til ta niðurstøðu nú, at tað er ikki sinnað at halda fram við virkseminum í núverandi støðu uttan at hava nakra vissu fyri, at sáttmálin við kommununa verður longdur. Felagið sigur, at um kommunan ikki ynskir at geva tilsøgn um leinging av sáttmálanum, er felagið ikki sinnað at halda fram í hesum sáttmálaskeiði nevnliga árið út.

<u>Viðmerkingar frá leiðaranum á KB:</u>
Sambært sáttmálanum hevur arbeiðstakarin ikki møguleika at siga sáttmálan upp. Einans kommunan kann siga sáttmálan upp, og tá við 6 mánaða uppsagnarfreist. Í slíkum føri hevur kommunan rætt og skyldu til at yvirtaka renovatiónsbilarnar, um annar av pørtunum ynskir tað.
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini metir, at tað er óheppið fyri trygdina og góðskuna í ruskinnsavningarskipanini at hava sáttmála við ein arbeiðstakara, ið ikki ynskir at halda fram. Leiðarin á kommunalu Brennistøðini er tí av teirri áskoðan, at um arbeiðstakarin ynskir at verða loystur frá sáttmálanum av fíggjarligum orsøkum, so er rættast av kommununi at finna eina loysn, soleiðis at arbeiðstakarin sleppur burturúr sáttmálanum samstundis sum kommunan framhaldandi fær røkt sína lógaásetta skyldu at hava eina innsavningarskipan.

**Tilmæli:**
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mælir til:
1. At kommunan ikki leingir sáttmálan við verandi arbeiðstakara, uttan at útbjóðing av ruskinnsavningini fer fram.

2. At kommunan sostatt boðar arbeiðstakaranum frá, at tilsøgn um leinging tískil ikki verður givin.
3. At kommunan, um arbeiðstakarin framvegis ynskir at verða loystur frá sáttmálanum, bjóðar arbeiðstakaran at kommunan kann siga sáttmálan upp við styttari uppsagnartíð (beinanvegin) og við yvirtøku av renovatiónsbilunum (3 bilar til húsarhaldsburturkast og 1 bil til pappírsinnsavning) og starvsfólkið fær tilboð um starv.
4. At kommunan sjálv rekur innsavningini víðari fyri fyrst, inntil endalig støða til útbjóðing verður tikin, nú ella seinni.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. mars 2009:** Nevndin samtykti at halda fast við verandi sáttmála.

Nevndin samtykti, at umsitingin fyrireikar útbjóðingartilfarið, soleiðis at útbjóðingin kann fara fram skjótast til ber.

**Fíggjarnevndin 30. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini 24. mars 2009.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**91/09** **<u>2009-0754 BAM</u>**

**<u>Ruskinnsavning: Støðutakan til yvirtøka av renovatiónsbilum og útbjóðing av sáttmála</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Verandi sáttmáli um ruskinnsavning við Sp/F Tom Hellisdal gongur út 31. desember 2009.

Tá sáttmálin gongur út, og annar av sáttmálapørtunum ynskir tað, skal arbeiðsánarin (Tórshavnar kommuna) yvirtaka renovatiónsbilarnar, ið ikki eru eldri enn 6 ár. Tað vil siga 2 bilar til húsarhaldsburturkast, ið komu í 2007, og pappírsbilin, ið kom í 2004.
Tann parturin, sum ynskir at arbeiðsánarin yvirtekur bilarnar, skal boða hinum partinum frá hesum í seinasta lagi 6 mánaðir áðrenn sáttmálin gongur út, t.v.s. í seinasta lagi 30. juni 2009.
Yvirtøkuvirðið er grundað á linjurætta avskriving yvir 7 ár. T.v.s. at báðir bilarnir til húsarhaldsburturkast skulu yvirtakast fyri 4/7 av nývirði, sum var umleið 1,1 mió fyri hvønn, og pappírsbilurin skal yvirtakast fyri 1/7 av nývirði, sum var uml. 1,8 mió.

Støða skal tí takast til:

1. Um kommunan ynskir at yvirtaka renovatiónsbilarnar, tá sáttmálin gongur út.
2. Hvussu ruskinnsavningin skal skipast eftir at verandi sáttmáli er farin úr gildi, her verður hugsað um, hvørt ruskinnsavningin skal bjóðast út til arbeiðstakara at reka, ella um kommunan sjálv skal reka innsavningina.

Fyrimunir við útbjóðing:

- Minni umsiting av fyrispurningum, klagum o.t.
- Minni umsiting av starvsfólkamálum.
- Minni umsiting av viðlíkahaldi og rakstri av arbeiðsamboðum. (renovatiónsbilar)
- Kommunan sleppur undan at gera íløgur í kostnaðarmikil arbeiðsamboð (renovatiónsbilar).
- Vandin fyri óvæntaðum útreiðslum, t.d. uppá bilar, er minni.

Vansar við útbjóðing:

- Innsavningarskipanin gerst meiri stirvin, og tað er torførari at gera broytingar, tá arbeiðstøkan er ásett í sáttmála.
- Kommunan rindar MVG av allari sáttmálaupphæddini, og fær einans afturgoldið 75%, harvið gerst arbeiðslønin 6,25% dýrari.
- Rentuútreiðslur av lánum til íløgur í arbeiðsamboð skulu fíggjast.
- Kommunan hevur ikki beinleiðis ræði á arbeiðsamboðum og starvsfólkunum, og í mun til lógarásettu skylduna at hava ruskinnsavning kann hetta vera óheppið í ávísum førum (t.d. konfliktstøður ella fíggjarligir trupulleikar hjá arbeiðstakara).
- Útbjóðing og sáttmálarøkt krevur arbeiðsorku.

Fyrimunur við at kommunan sjálv rekur innsavningina:

- Tað er lættari at gera broytingar í innsavningarskipanini
- Tað skal ikki rindast MVG av arbeiðsløn
- Kommunan fíggjar vanliga sínar íløgur í arbeiðsamboð uttan lántøku og hevur tí ikki rentuútreiðslur.
- Kommunan hevur ræði á arbeiðsamboðum og –fólkunum, og tí er størri trygd fyri at lógarásetta skyldan at hava eina ruskinnsavningarskipan, altíð kann røkjast.
- Kommunan – innsavnarin – borgarin verða tættari knýtt saman, harvið gerst lættari at fáa loyst mál um trupulleikar við innsavningini.

Vansar við at kommunan sjálv rekur innsavningina:

- Meiri umsiting av fyrispurningum, klagum o.t.
- Meiri umsiting av starvsfólkamálum.
- Neyðugt er at seta arbeiðsleiðara/samskipara at taka sær av dagligu leiðsluni og samskipanini av ruskinnsavningini
- Meiri umsiting av viðlíkahaldi og rakstri av arbeiðsamboðum. (renovatiónsbilar)
- Kommunan skal gera íløgur í kostnaðarmikil arbeiðsamboð (renovatiónsbilar).
- Vandin fyri óvæntaðum útreiðslum t.d. uppá bilar er størri.

Útbjóðingartilfar til útbjóðing er í gerð og er komið væl ávegis. Útbjóðingartilfarið byggir á, at komandi arbeiðstakari skal yvitaka renovatiónsbilarnar, sum kommunan yvirtekur frá verandi arbeiðstakara.

Leiðarin á KB kemur at greiða frá gongdini í málinum

**Tilmæli:**
Umsitingin kemur við tilmæli til fundin.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. mars 2009:** Nevndin samtykti at ruskinnsavningin skal bjóðast út alment.

Nevndin samtykti eisini, at kommunan yvirtekur renovatiónsbilarnar sambært ásetingunum í sáttmálanum. Nevndin ynskir tó, at tað ikki verður kommunan, men nýggi arbeiðstakarin, ið yvirtekur renovatiónsbilarnar.

Nevndin ynskir at ein eftirmeting av sáttmálaskeiðinum verður gjørd, at leggja fyri nevndina áðrenn farið verður undir útbjóðingina.

**Fíggjarnevndin 30. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini 24. mars 2009 við teirri broyting at kommunan ikki yvitekur renovatiónsbilarnar, men at nýggi arbeiðstakarin yvirtekur renovatiónsbilarnar beinleiðis.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**92/09** **<u>1999-0606</u>**

**<u>Skipanarætlan fyri rennibreytina</u>**.

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Býarskipanardeildin hevur, vísandi til mentamálanevndarsamtyktina dagfest 24. juni 2003, og samtyktina í byggi-og býarskipannevndini j. nr. 9902090-1, gjørt skipanarætlan fyri økið á Hálsi har ein rennibreyt er staðsett.

Uppskotið skipar økið við einari rennibreyt við 8 geirum og einum fótbóltsvølli inni í miðjuni.

Øki er lagt av til parkering og møguligar bygging til virksemið.

Skipanarætlanin leggur upp til at ásetingarnar fyri fyri økið skulu broytast frá at vera C2 - opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki fyri tað økið har rennibreyting liggur.

Ætlanin hevur eisini við sær, at onnur vegatgongd skal finnast til matr.nr. 1394 – sethús og grundstykki og matr.nr. 1408 b og 1408 c – ogn hjá Føroya Tele (dagstovnurin KURLAN).

Ein slík rennibreyt við einum fótbóltsvølli í miðjuni hevði verið eitt skilagott uppískoyti til Gundadal og á Hálsi sum ítrottarøkið.

Hjálagt er uppskot til skipanarætlan j. nr. 200202698-4

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin í mentamálum mælir til at arbeitt verður víðari við málinum, og at ein byggiskrá verður gjørd fyri verkætlanina.

**Mentamálanevndin 21. apríl 2004:** Samtykt at arbeiðssetningurin verður soljóðandi:

**Arbeiðssetningur**
Arbeiðsbólkur verður settur at gera eina byggiskrá til ger av rennubreyt við tilhoyrandi økjum og útgerð í Tórshavnar kommunu.

**Byggiskráin skal m.a. innihalda:**

- Skipanarætlan fyri økið á Hálsi, sambært j. nr. 9902090-1, sum plandeildin hevur gjørt, herundir:
  - Stødd, plasering o.a.
  - Uttanduraøki
  - Hølisskrá
  - Atkomuviðurskifti
  - Útbyggingarmøguleikar
- Ognarviðurskifti
- Tíðarætlan
- Leiðbeinandi kostnaðarmeting, býtt sundir í:
  - Undirlendisarbeiðið
  - Breyt við 8 geirum
  - Miðøki við einum fótbóltsvølli
  - Uttanumøki, atkoma, parkering og møguligar bygging til ymiskt virksemið, t.d. gistingarhús.
  - Møguliga atkoma til verandi stadionøki

Bólkurin eigur eisini at hava fyrilit fyri myndugleikakrøvum og øðrum viðurskiftum, soleiðis at hesi verða lýst, nevnast kann m.a.:

<u>at</u> byggisamtyktini skal broytast frá at vera C2 – opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki.

at  kommunan má ogna sær uml. 4000 $m^2$ frá matr.nr. 1393.
at  vegatgongd til grannaognir skulu fáast upp á pláss.

Byggiskráin skal leggjast fyri mentamálanevndina í seinasta lagi 30. juni 2004.

Eisini samtykt at arbeiðsbólkurin hevur 3 limir:

1 umboð fyri Trivnaðarfyrisitingina, sum verður formaður
1 umboð fyri Teknisku fyrisitingina og
1 umboð fyri Sersamband fyri frælsan ítrótt

og at játta kr. 200.000 av konto 64 til byggiskránna.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Málið varð lagt fram og verður arbeitt víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur eftir summarfrítíðina.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avgerandi fortreyt fyri at økið kann brúkast til rennibreyt, er at broyting verður gjørd í byggisamtyktini, har økið verður broytt frá C2-opin miðstaðarbygging til at verða D2, ítróttarøki.

Serstøk byggisamtykt er fyri lítlan part av økinum, sum er kannaður traðarbrúki og velt lendi. Men við atliti til, at talan er um so lítlan part av verkætlanini sum verður umfataður av hesum, og vísandi til at aðrir vegir eru lagdir í økinum undir somu ásetingum, metir býararkitekturin ikki at hetta kann hava við sær at neyðugt verður at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Tilmæli:**
Vísandi til samtykt 22. mars 2004, tá byggi- og býarskipanarnevndin góðkendi skipanarætlan fyri økið, soleiðis at arbeiðast kundi víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur. Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur undir við ætlanini, so at farast kann undir at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við ætlanini, og at mæla býráðnum til at broyta byggisamtyktina sambært kortskjali 1999-0606/32, dagfest 13. juni 2005, frá C2 øki til D2 øki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest 14. juni 2005, og at játta peningin, kr. 700.000,00, ið er tøkur á konto 64, til projektering

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.**

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at bjóða arbeiðið út.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Býararkitekturin greiddi frá málinum, sum verður viðgjørt á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Útsett.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur kannað møguleikar fyri endaliga staðseting og skipan av rennibreytini og vil grunda á lýsinda tilfar, ið er fingið tilvega, mæla til, at farið verður undir at gera eina rennibreyt á Hálsi. Sí kortskjal nr. 19990606 dagfest. 19.05.2006.

Hjálagt er eisini kostnaðarmeting uppá verkætlanina og verður heitt á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at útvega neyðuga pening til verkætlanina.

Vísandi til avgerð í bygginenvndini um skipan av arbeiðinum, mælir nevndin víðari til, at tikið verður av innkomna undirhondsboð uppá arbeiðið at grava oman av á økinum. Hjálagt eru tvey innkomin undirhondsboð.

Vísandi til mannagongd fyri bygging/verkætlanir í Tórshavnar kommunu, mælir bygginevndin víðari til at senda málið til ummælis í hinum faknevndunum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Tvey tilboð eru innkomin:

| | |
|---|---|
| Karl Patursson | kr. 1.189.050,00 |
| Robert Brockie | kr. 1.565.483,00 |

Mentamálanevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá Maskinkoyring við Karl Patursson kr. 1.189.050,00.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Støðuplanur av verkætlanini hevur verið viðgjørdur í teknisku umsitingini.

Eftir sum einki ítøkiligt tekniskt projekt fyriliggur í løtuni, verður greitt frá verkætlanini og hvørji atlit eiga at verða tikin í sambandi við ymsum tekniskum viðurskiftum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at arbeitt verður víðari við projektering av verkætlanini.

**Tekniska nevnd 1. juni 2006:** Nevndin mælir til, at verkætlanin eisini fevnir um betri atkomuviðurskifti frá Sundsvegnum og eina tryggari gonguleið til Gundadalsøkið umframt tekniskar veitingar so sum kloakk, vatn, ljós o.a. at leggja fyri nevndina aftur.

**Býráðið 8. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur síðani verið við at kanna ymisk viðurskiftir í økinum, sum liður í endalig projektering. Hesar kanningarnar eru gjørdar í tøttum samstarvi við teknisku fyrisiting – tekniska deild og heilsu- og umhvørvisdeildir hjá TK og landinum, og hava hesar kanningarnar ført við sær, at ávíst neyvari kanningargreystur er neyðugur og kann hava við sær broytt arbeiðslag enn upprunaliga ætlað.

**Tilmæli frá ráðgeva:**
*<u>Viðv.: Rennibreyt á Hálsi</u>*
*Í samband við grevsturin av leysa áskotinum fram við Norðara Ringveg er gjørdur ein royndargrevstur í helluni, sum ætlanin var at spreingja seinni. Grevsturin er gjørdur við tí á staðnum verandi maskinu. Hellan er rættiliga stabbakend, og tað ber til at "grava" hana. Tilfarið, sum kemur frá maskinuni, sær út sum knúst tilfar, ið er sera væl hóskað til planering av m.a. veg- og parkeringsøkinum. Hetta opnar fyri møguleikanum at gera vegin oman til Kurlu við endaligari umlegging av instalatiónum, eins og at seta lyktafundamentir, kantsteinar í ytra borði og fáa skráan móti ringvegnum og Sundsvegnum lidnan í verandi arbeiðstøku. Í hesum umfari verður eisini nýggja parkeringsøkið við Kurlu gjørt.*

*Arbeiðið við grevstri á økinum, har gamli verkstaðurin hjá Tórshavnar kommunu stóð, er í løtuni lagt stilt orsaka av manglandi plássi í Húsahaga. Um farið verður undir omanfyri nevndu ætlan, kann hetta arbeiði fremjast, meðan TK greiðir viðurskiftini í Húsahaga, og harvið kann arbeiðið sum heild ganga víðari. Verður hendan ætlan framd, er næst komandi arbeiðsveiting eitt greitt definerað øki uttan fyribilsloysnir.*

*Parkeringsøkið, sum skal gerast á verandi ruskøki, verður planerað í staðin fyri at leggja grót í rúgvu. Hetta verður uttan gjald, tí tað er líka lætt at gera planeringina sum at leggja grót í rúgvu. Atkoman til Kurlu verður sum hon er í løtuni, til hon verður broytt til endaliga atkomu. Við hesi loysn verður soleiðis ikki*

*neyðugt at gera fyribils atkomu tvørtur um ognina hjá Shell. Koyringin eftir ognini hjá Føroya Termovirki verður bert nýtt í sambandi við atkomu til vegin Undir Svartafossi. Vegurin frá gamla Sundsvegnum til ognina hjá Jóa og Randi Ziska, sum liggur á tyrving, kann eisini takast burtur í hesi arbeiðsgongd.*

*Sambært avtalu hava vit gjørt eina skitsuætlan fyri arbeiðsgongdina og tilhoyrandi tilboðslista fyri hesa arbeiðsveiting.*

*Maskinkoyring hevur givið hjálagda tilboð, dagfest 29.08.2006, uppá hesa arbeiðs-veiting, áljóðandi kr. 2.101.300,00 uttan mvg, og arbeiðið kann fremjast uppá 12 vikur. Um tað gerst neyðugt at brekka í støðum, verður einki eykagjald í hesum sambandi.*

*Vit hava kannað kostnaðin og vilja mæla ti, at tikið verður við tilboðnum. Er áhugi fyri hesi ætlan, vil Verkfrøðingastovan beinanvegin broyta projektið í samsvar við broyttu fortreytirnar.*

Bygginevndin er á fundi kunnað um hesa ætlan og hevur einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Verkfrøðingarstovuni og mælir tískil býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at taka av tilboðnum frá Maskinkoyring áljóðandi 2.101.300,00 kr. uttan mvg.

Víðari í málinum er TK í tí støðu at umhugsast skal, um ikki tað kann loysa seg at taka støðu til niðanfyristandandi tilmæli frá Verkfrøðingarstovuni grundað á trupulleikunum, sum standast av, at tyrvingarplássið í Villingardali, ikki sum er, er ført fyri at taka ímóti tilfar til tyrving.

*Vísandi til avtalu á fundi við bygginevndina 31.08.2006 hevur Verkfrøðingastovan 01.09.2006 sett fyrispurning til Heilsufrøðisligu Starvsstovuna um loyvi til at tyrva meginpartin av tilfarinum á staðnum í staðin fyri sum ætlað í Húsahaga.*

*Heilsufrøðisligu Starvsstovunan hevur við viðhefta skrivi, dagfest 07.09.2006, góðkent ætlanina við ávísum treytum.*

*Grundað á at loyvi er fingið til eina loysn, har tilfarið frá gamla ruskplássinum við serligari fyriskipan verður lagt út sum fylla undir rennibreytini, verður heitt á Tórshavnar kommunu um at geva Verkfrøðingastovuni heimild til at fara undir samráðingar við Maskingrevstur um í minsta lagi at gera neyðuga arbeiði við avgrevstri v.m. á matr. nr. 1395, soleiðis at tann ígongdverandi arbeiðstøkan, sum er steðgað, kann halda áfram, og øskan v.m.,. sum liggur á matr. nr. 1395, og sum fylla í vegnum Undir Svartafossi verður innbygd undir vøllinum.*

*Sum trýstið er á arbeiðsmarknaðinum í løtuni, meta vit tað rætt sum skjótast at gera avtalu við Maskinkoyring um framhaldandi arbeiði, tó sjálvsagt treytað av at semja fæst um kostnaðin.*

Bygginevndin er somuleiðis á fundi kunnað um hesa ætlan og hevur einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum frá Verkfrøðingarstovuni og mælir tískil

býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at loyva Verkfrøðingarstovuni at innheinta eitt slíkt tilboð.

Býararkitekturin og ráðgevin koma á fund at greiða frá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og taka av tilboðnum hjá Maskinkoyring uppá kr. 2.101.300 uttan mvg og at taka upp samráðingar við Maskinkoyring um víðari arbeiðstøku.

**Mentamálanevndin 20. september 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við fíggjarnevndarsamtyktini 13. september 2006.

Býráðið 21. september 2006: Einmælt samtykt.

**Viðgerð av tilboðum uppá belegning til rennibreytina**
Polytan er komið við fullfíggjaðum tilboði uppá belegning til rennibreytina á Hálsi. Tilboðið ljóðar uppá 2.869.333 við útgerð. Uttan útgerð er tilboðið uppá 2.376.893.

Í byggiskránni er belegningur og undirlag mett til 3.6 mio. Í stórum tølum samsvarar hetta við tilboðið, um asfaltið verður roknað til 200 kr fermeturin ella 1.3 mio tilsamans.

Í kostnaðarmetingini er roknað við 13 mm belegningi. Eftir norsku ásetingunum er tjúgdin 15 mm belegningur. Tilboðið frá Polytan er við 15 mm belegningi.

Tilboðið frá Polytan er kannað. Prísirnir samsvara við prísum frá líknandi verkætlan í Noreg.

Mælt verður til at taka av tilboðnum uppá belegning til frá Polytan uppá kr. 2.376.893.

Málið um útgerð verður tikið upp á seinni fundi.

**Belegningur v.m.**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2.1.1 | Kanning av undirarbeiði | 1 stk. | 12.000,00 | 12.000 |
| 2.1.2 | Verndartiltøk | 1 stk. | 8.000,00 | 8.000 |
| 2.1.4 | Byggiplássrakstur | 1 stk. | 12.000,00 | 12.000 |
| 2.1.5 | Byggipláss-skúr o.l. | 1 stk. | 8.000,00 | 8.000 |
| 2.2.1.1 | 15mm belegningur | 6.500 m² | 278,00 | 1.807.000 |
| 2.2.1.2 | belegningur í vatngrøv | 15 m² | 540,00 | 8.100 |
| 2.2.1.2 | Meirkostnaður fyri 22 mm | 134 m² | 177,00 | 23.718 |
| 2.2.1.2 | Meirkostnaður fyri kantar | 900 m | 12,00 | 10.800 |
| 2.2.1.3 | Satsplankar | 8 stk. | 5.400,00 | 43.200 |
| 2.2.1.4 | Stavkassi við lok | 1 stk. | 5.600,00 | 5.600 |
| 2.2.1.5 | Belegningur á lok | 3 stk. | 250,00 | 750 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2.2.1.6 | Belegningur á lok | 3 stk. | 125,00 | 375 |
| 2.2.2 | Uppmáting-kontroll.merkjapl. | 1 stk. | 130.000,00 | 130.000 |
| 2.2.3 | Test | 1 stk. | 40.000,00 | 40.000 |
| 2.2.4 | Sargur | 1 stk. | 75.000,00 | 75.000 |
| 2.2.5 | Rakstrar og viðlíkahaldsætlan | 1 stk. | 6.000,00 | 6.000 |
| 2.2.6 | Kantsteinar | 480 m | 290,00 | 139.200 |
| 2.2.6 | Lok til vatngrøv inkl belegning | 1 stk. | 42.500,00 | 42.500 |
| 2.2.6 | Bummsett | 1 stk. | 4.650,00 | 4.650 |
| 2.2.6 | Ringur og stopplanki | 1 stk. | 5.500,00 | 5.500 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Belegningur tilsamans** | | | | **2.376.893** |
| Asfalt (mettur kostnaður) | 6.500 m² | 200 | 1.300.000 | **1.300.000** |
| **Tilsamans 1)** | | | | **3.676.893** |

1) í byggiskránni er henda veitingin u. útgerð mett til 3,6 mio.

**Tilmæli frá bygginevndini:**
Leivur Hansen, limur, er kunnaður um tilmælið og hevur boðað frá, at hann tekur undir við nevndini, og er hetta tískil ein samd nevnd, sum mælir til at taka av tilboðnum.

Bygginevndin fyri rennibreytina mælir til at taka av tilboðnum frá POLYTAN, áljóðandi 3.676.893 kr. uttan mvg.

**Mentamálanevndin 16. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá POLYTAN, áljóðandi kr. 3.676.893,00 uttan mvg.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. februar 2007:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi viðgjørt verkætlanina og tey ynski, sum hava stungið seg upp í samband við arbeiðið. Verkætlanin er við hesum ynskjunum farin uppum kostnaðarmetingina, og skal málið tískil leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til støðutakan.

Hjálagt er fundarfrásøgn frá bygginevndini fyri rennibreyt á Hálsi.
Bygginevndin mælir til, at býráðið tekur av tilboðnum, sí hjálagt fundarfrásøgn og tilmæli frá bygginevndini.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Rúni Abrahamsen, ark., og Jákup E. Hansen, tekniskur stjóri, greiddu frá verkætlanini.

Samlaði kostnaðurin er mettur til tkr. 26.600. Av hesum eru játtaðar tkr. 3.000.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við bygginevndini og at játta tkr. 23.600 av íløgum 2007.

**Mentamálanevndin 22. februar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við fíggjarnevndini 16. februar 2007.

**Býráðið 22. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi umrøtt verkætlanina við atlitið til innkomið skriv frá Sp/f Maskinkoyring, har biðið verður um at sleppa undan dagbótakravinum hjá Tórshavnar kommunu.

Sum partur av royndini at greiða málið, hevur umsitingin heitt á advokat at meta um málið. Samanskrivað notat frá byggileiðsluni og advokatinum, er lagt í málið.

Arbeiðið, er handað kommununi við manglum, og einum parti, sum ikki er gjørdur liðugur. Hetta er parkeringsøkið á vestaru síðu. Hetta er mett av bygginevndini, sum neyðugt at taka fyribils burturúr fyri at kunna fáa tikið breytina og økið annaras í nýtslu.

Á fundinum í bygginevndini seinast, varð so tikið saman um:

Greitt var frá at smb. avhendingarskjalinum skuldi arbeiðið endaliga verið liðugt, men hetta er ikki so. Arbeiðstakarin hevur ikki virt avtaluna, hóast hann hevur fingið skrivliga áminning um hetta smb. ABF06. Tískil kann staðfestast ein ósemja, sum bygginevndin skal taka støðu til. Maskinkoyring hevur biðið um at dagbótakravið verður fráfallið.

Dagbótakravið er á kr 1.787.056. Spurningurin um at gera eina semju um helvtina av dagbótakravinum er umrøddur í bygginevndini treytað av, at arbeiðið verður gjørt liðugt beinanvegin. Ein meiriluti í bygginevndini mælir til at kommunan heldur seg til fastar mannagongdir og avgerðir í líknandi málum, og ikki ger semju um dagbøtur.

Sum avleiðing av at undirtøka ikki varð í bygginevndini fyri at strika helvtina av dagbótunum kravdu Sjúrður Olsen og Leivur Hansen at málið verður lagt fyri fíggjarnevndina til politiska støðutakan.

Grundað á hesa niðurstøðu í bygginevndini, verður málið við hesum beint til politiska viðgerð hjá avvarðandi nevndum.

Umsitingin kemur at greiða frá málinum.

**Ískoyti II:**

Í samband við, at tvey politisk umboð í bygginevndini fyri rennibreytina, Sjúrður Olsen og Leivur Hansen, hava kravt avgerðina hjá bygginevndini um ikki at strikað dagbøtur til politiska viðgerð, hava tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á Løgdeildini skrivað notat um møguligar avleiðingar av at strikað dagbøtur í konkreta málinum. Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á løgdeildini vísa á, at talan er um eitt sera prinsippielt mál. Víst verður til notatið (**skjal 1999-0606/64)** sum verður útflýggja á fundinum.

Samanumtikið er niðurstøðan í nevnda notatið, at ein avgerð um at strika dagbøtur í hesum máli kann skapa præcedens í øðrum líknandi málum. Ein slík avgerð kann eisini hava við sær, at ásetingar í útbjóðingartilfari og í sáttmálatreytum í framtíðini ikki verða tiknar fyri fult.

Sum kunnugt er dagbótakravið ofta einasti sanktiónsmøguleiki hjá kommununi, og tí kann tað vera rættuliga álvarsamt um Tórshavnar kommuna við eini slíkari avgerð gevur byggivinnuni eitt signal um, at kommunan í veruleikanum ikki hondhevar sáttmálaásetingar um dagbøtur. Eisini kann ein avleiðing verða, at aðrir arbeiðstakarar, sum hava goldið dagbøtur til kommununa, fara at seta fram krav um at fáa peningin afturgoldnan. Verður kravið um dagbøtur slept í hesum málinum má kommunan eisini umhugsa at sleppa kravið í verandi málum, eitt nú í gerðarrættarmálinum mótvegis P/f Byggitek.

Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á løgdeildini mæla tí mentamálanevndini, fíggjarnevndini og býráðnum staðiliga til at halda fast um tí mannagongd sum kommunan hevur hildið seg til higartil, og at taka undir við avgerðini hjá meirilutanum í bygginevndini, um ikki at strikað dagbøtur, men at halda fast um kravið bæði í hesum og í øðrum málum.

**Mentamálanevndin 3. desember 200**8: Jóhan E. Simonsen, løgfrøðingur, greiddi frá málinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Málið verður tikið upp aftur og samstundis verða allir partarnir í málinum innkallaðir.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2009:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti í.s.v. endaliga uppgerð av kostnaðinum.**
Í sambandi við at verkætlanin Tórsbreyt er um at vera liðug, hevur bygginevndin gjørt eina fíggjaruppgerð í málinum.

Í kostnaðarmeting, dagfest 15.02.2007, frá MAP arkitektar, ið er samskipandi ráðgevi í málinum, er verkætlanin mett at koma at kosta 26.600.000 kr. Henda meting varð viðgjørd í bygginevndini, og varð samtykt at mæla býráðnum, umvegis mentamálanevnd og fíggjarnevnd, at játta pening.
Hetta varð so gjørt, sí málsgongd í málinum. j.nr. 1999-0606.
Aftrat hesari játtan, legði bygginevndin umbøn fyri býráðið um at taka av einum tilboði frá arbeiðstakaranum uppá 2.733.000 kr. fyri burturbeining av øsku og

ilsku, sum verkætlanin hevði rent seg í undir útgravingini til rennibreytina. Hetta var álagt kommununi av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.
Býráðið tók av tilboðnum, sí j. nr. 1999-0606

Við gjøgnumgongd av skjølunum í sambandi við endauppgerðina, er komið fram, at upprunaliga kostnaðarmetingin upp á 26.000.000 kr. frá 15.02.2007 var skeiv, og manglaðu uml. 3.400.000 kr í. Hetta merkir, at kostnaðarmetingin, sum átti at verið løgd fyri býráðið til støðutakan, sostatt átti at ljóðað uppá 30.000.000 kr. í staðin. Sí j. nr. 1999-0606 notat.

Kostnaðarmeting (26.600 uppr.) 30.000
Meirkostnaður av øsku og ilsku 2.733
**Kostnaðarmeting íalt 32.733**
Íroknað 6,25% mvg

Bygginevndin hevur sostatt gjørt eina endaliga fíggjaruppgerð grundað á øll fyriliggjandi skjøl, knýtt at kostnaðinum, og uppgerð av manglum og eftirliggjandi arbeiðum.

Endaligur kostnaður sambært uppgerð frá Verkfrøðingastovuni

**Kostnaður rennibreyt við 6,25% mvg**
(sí uppgerð skjal j.nr. 1999-0606) **31.680**

Í sambandi við verkætlanina var neyðugt at gera seg inn á grannar í økinum, sum máttu lata lendið. Avtala varð gjørd við hesar grannar um makaskifti og ávís avleidd arbeiðir í samband við hetta.

**Onnur arbeiði við 6,25% mvg 504**
(Kurla 228.270,03x 6.25% mvg)
(Matr.nr. 1394 & 1397 246.000.00x 6.25% mvg)
**Íalt 32.184**

Haraftrat hevur bygginevndin viðgjørt keyp av útgerð, sum hoyrir til slíkt annlegg fyri frælsan ítrótt. Avgjørt var at keypa tað, sum var krav fyri at kunna íðka treytarbundnu ítrottargreinirnar.

**Útgerð, sum kommunan hevur keypt 396**
**Íalt 32.580**

Bygginevndin hevur, sum vanligur liður í slíkum verkætlanum, eftirmett verkætlanina við atliti til at betra um fortreytir og virkishátt fyri einum slíkum tilboði til borgaran, og er leypandi komin fram á ting, sum kunna koma at sýnast sum manglar, og ting, sum vilja betra munandi um brúkið av Tórsbreyt. Hetta eru arbeiðir, sum ikki eru umbiðin enn, men sum bygginevndin metir eiga at fáa eina viðgerð í býráðnum.

| | |
|---|---|
| Aðrar útreiðslur í.s.v. møguliga liðugtgerð<br>(sí j. nr. 1999-0606 kostnaðaruppgerð) | 1.188 |

**Íalt 33.768**

Grundað á omanfyristandandi ber til at taka soleiðis samanum.

Býráðið hevur játtað íalt kr. 26.600.000 til verkætlanina, grundað á, kostnaðarmeting frá MAP, dagfest 15.02.2007. Henda upphædd átti at verið 30.000.000 kr.
Burturbeining av øsku og ilsku, álagt kommununi at burturbeina. Tilboð tikið av í býráðnum, áljóðandi 2.733.000 kr. Hetta er ein serstøk umbøn.
Útreiðslur avleiddar av verkætlanini, viðvíkjandi grannaognum, áljóðandi 504.000 kr. Her er serstakliga tað, ið er gjørt inni hjá dagstovninum KURLA, ein spurningur, um hetta alt eigur at leggjast til verkætlanina.
Keyp av útgerð til frælsan ítrott. Hetta var ongantíð partur av verkætlanini, men er síðan mett neyðugt at fáa við, áljóðandi 396.000 kr.

Endaliga kann sigast, at bygginevndin mælir til, at býráðið játtar pening til tær útreiðslur, sum undir "Aðrar útreiðslur í.s.v. møguliga liðugtgerð", áljóðandi 1.188.000 kr., mugu metast at betra um verkætlanina.

Bygginevndin harmast um broytta kostnaðin fyri verkætlanina, men metir tó, at kommunan við Tórsbreyt hevur fingið eitt annlegg í kommununi sum fer at leggjast til tilboðini til borgarin, og sum fer at merkjast innan trivnaðin og almennu fólkaheilsuna í stóran mun.

**Bygginevndin mælir til:**
Grundað á omanfyristandandi uppgerð verður við hesum biðið um írestandi fígging, soleiðis at samlaða játtanin fyri verkætlanina verður áljóðandi 33.768.000 kr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini at játta kr. 7.168.000,00 av íløgum á skúla og mentan 2009.

**Mentamálanevndin 4. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at alt málið verður avgreitt saman við uppgerð við høvuðsarbeiðstakaran. Umsitingin kemur við frágreiðing og tilmæli til komandi fund.

**Ískoyti:**
**Eykaarbeiði**
MAP Arkitektar og fakeftirlitið, Verkfrøðingastovan, eru samd um, at upphæddin fyri eykaarbeiði er kr. 328.390,00 u.mvg og ikki kr. 393.037,50 u.mvg, sum Karl

Patursson heldur uppá. Upphæddin á kr. 328.390,00 u.mvg kann útgjaldast, um játtan er tøk á konto 1037-90-37006.

**Liðuggerð**
MAP Arkitektar vísa í telduposti 13. mars 2009 á, at sambært fíggjarligu uppgerð teirra er samsvar millum uppgerðina hjá Karl Patursson og teirra egnu uppgerð fyri virði á írestandi arbeiðinum, men tað sær út til at verða ein roknifeilur á kr. 47.660,15 í uppgerðini hjá Karl Patursson. Upphæddin fyri írestandi arbeiði hjá Karl Patursson er sostatt kr. 863.990,60 og ikki kr. 911.650,75 u/mvg, sum yvirlitið hjá Karl Patursson vísir. Henda upphædd – kr. 863.990,60 - kann útgjaldast fyri írestandi arbeiði, tá tað er gjørt, treytað av at játtan er tøk á konto 1037-90-37006.

Tekniski stjórin og býararkitekturin, sum eisini er formaðurin í bygginevndini, eru tó samdir um, at tað prinsippielt er skeivt at lata Karl Patursson upp í hendi at gera arbeiðið liðugt. Hann hevur ikki gjørt manglarnar innan fyri ásettu tíðarfreistina í avhendingarskjalinum og er fyri langari tíð síðani rýmdur av byggiplássinum, og eigur ikki at sleppa innaftur har og fáa hetta arbeiði uttan útbjóðing enn einaferð. Arbeiðið kann bjóðast út til nakrar arbeiðstakarar í innbodnari lisitatión, so skjótt sýn og meting hevur verið, og er ikki óhugsandi at kommunan kann fáa eina bíligari loysn burturúr tí. Tað at grannin hevur ampað av, at arbeiðið ikki er liðugt enn verður ikki mett sum nóg góð orsøk til at geva Karl Patursson framíhjárætt til hetta arbeiði enn einaferð, tí tað er júst Karl Patursson og ikki kommunan sum er orsøk til, at viðurskiftini við grannan eru endað í tí støðu tey eru.

**1. <u>Dagbøtur</u>**
Undirritaði, formaðurin í bygginevndini og leiðarin á løgdeildini vilja staðiliga mæla frá at gera nakað sum helst av frávik ella seravtalu um dagbøturnar í hesum málinum. Víst verður til áður gjørt notat um hetta sama. At ein avgerð um at strika dagbøtur heilt ella lutvíst kemur at skapa fordømi er als ongin ivi um, og slíkt frættist skjótt í vinnuni. Dømi er longu um hetta, tí arbeiðstakarin, ið ger annað arbeiði fyri kommununa, hevur fyri fáum døgum síðani biðið um alment innlit í onnur mál, har spurningurin um dagbøtur hevur verið viðgjørdur. Ein avgerð um at strika dagbøtur heilt ella lutvíst er tað sama sum at broyta sáttmálatreytir, aftaná at sáttmálin er gjørdur, og hetta er í allar mátar skeivt og sendir eitt signal út um, at hóast kommunan er ein av landsins størstu byggiharrum, er ongin álvari í teimum sáttmálum kommunan ger.

Viðmerkjast skal, at ein møguligt striking av dagbótum viðførir, at játtast skal tilsvarandi eykajáttan afturat til verkætlanina, av tí at hædd ikki er tikin fyri hesum í samtyktini í mentamálanevndini 4. februar 2009.

Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa at enda á, at tað er fyrst og fremst byggi-nevndin og faknevndin, sum skulu viðgera og taka støðu til omanfyristandandi viðurskifti, vísandi til mannagongd fyri verkætlanir fíggjaðar av konto fyri íløgur.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at fíggjarnevndin beinir málið í mentamálanevndina og bygginevndina at taka støðu til fylgjandi viðurskifti:

1. at rinda eina upphædd á kr. 328.390,00 u.mvg til arbeiðstakaran fyri gjørd eykaarbeiðir, tá býráðið og fíggjarnevndin hava samtykt játtan til hetta
2. at liðugtgerðin av arbeiðinum verður boðin út í innbodna lisitatión, so skjótt sýn og meting hevur verið
3. at nokta at ganga umsóknini um fulla ella lutvísa striking av dagbótum á møti.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini 4. februar 2009, at játta kr. 7.168.000,00 av íløgum á mentan og frítíð 2009.

Eisini samtykt at beina málið um liðuggerð av rennibreytini í bygginevndina og faknevndina.

Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal samtykti at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum, býararkitektinum og leiðaranum á løgdeildini um ikki at strika dagbøtur.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen mælir til at kommunan tekur upp samráðingar við Karl Patursson um eina loysn á málinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 19. mars 2009:** Umrøtt.

**Býráðið 19. mars 2009:** Einmælt samtykt.

- Bygginevndin hevur havt fund, og hevur viðgjørt málið, sum álagt av Fíggjarnevndina. Niðurstøðan hjá bygginevndini sæst í hjálagda fundarfrágreiðing.

Vísandi til at nevndin er komin til tvey minnilutatilmælir, verður málið latið til mentamálanevndina til endaliga avgreiðslu.

**Tilmæli frá Boga Andreasen og Sjúrða Olsen:**
Vísandi til at Maskinkoyring sp/f hevur gjørt eitt gott arbeiði á Tórsbreyt og hevur royndir á staðnum, verður mælt til at heita á maskinkoyring sp/f um at gera arbeiðið liðugt fyri írestandi sáttmálaupphæddina. Maskinkoyring sp/f kann eisini gera arbeiðið beinanvegin og tí verður bágin sum minst fyri tey, sum búgva har og eru rakt av arbeiðssteðginum.

**Tilmæli frá Mikael Viderø og Jákup Simonsen:**
Maskinkoyring sp/f hevur brotið sáttmálan við Tórshavnar kommunu við at rýma av plássinum. Hóast fleiri áheitanir um at gera arbeiðið liðugt hevur arbeiðstakarin ikki víst vilja til hetta. Tekniska umsiting kann ikki liva við at tað ongar avleiðingar hevur fyri ein arbeiðstakara at bróta arbeiðstøkusáttmála. Mælt verður tí til at bjóða írestandi arbeiðið út av nýggjum í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 1. apríl 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá Boga Andreasen og Sjúrða Olsen.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**93/09** **2008-0268**

**Skriv frá Steen Juul Pedersen, har hann sigur seg úr løgtings- og fólkatingsvalstýrinum**

**Býráðið 19. mars 2009:** Samtykt at ganga áheitanini á møti.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Valdur varð Jákup E. Hansen.

**94/09** **2009-0175**

**Minnilutin hevur biðið um at fáa lagt uppskot til bygging av hølum til ellis- og røktarhúspláss fyri býráðið**

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt at beina málið í sosialu nevnd.

# Mál uttan fyri skrá

**95/08** **2008-3700/5 TK-P**

**Nevndarviðgerð: Rundkoyring Hvítanesvegur – Eystari Ringvegur – Útbjóðing Arbeiðstøka**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til mál nr. 2002-2014 og mál nr. 2008-1244.

Umsitingin hevur latið gjørt útbjóðingartilfar og tíðarætlan saman við ráðgevanum HMP- Consult Sp/f. Víst verður til TK j. nr. 2007-2151, 2007-2152, 2007-2153 og 2007-2155.

**“Trafiksikkerhedsrevision”:**
Umsitingin hevur havt verkætlanina “Rundkoyring Hvítanesvegur – Eystari Ringvegur” til “Trafiksikkerhedsrevision” hjá fyritøkuni Viatrafik í DK..

**Endalig góðkenning av verkætlanini hjá friðingarmyndugleikum:**
Umsitingin hevur eina latið umsókn inn til Náttúrufriðingarnevndina fyri Streymoyar Sýslu um góðkenning av verkætlanini Dispositiónsuppskot “Rundkoyring Hvítanesvegur – Eystari Ringvegur” D= 30 m, sum yvirfriðingarnevndin hevur góðkent.. Høvuðsprojektið við nýggjum diametri á 37 m má góðkennast av nýggjum hjá friðingarmyndugleikunum

**Plantuvøkstur fram við ognini hjá Sverra Joensen:**
Trø eru plantað fram við núverandi Hvítanesvegi og nakað fram við Eystara Ringvegi fram við ognini hjá Jákup Sverra Joensen. Avtala er gjød um, at hesi trø verða flutt, meðan arbeiðið fer fram fyri síðani at verða plantaði aftur í ein ljóðvollan. Eisini er ætlanin at planta trø og vøkstur í vegaskráarnar ímóti ognini hjá Landsverk og inni á ognini hjá Miðlon.

**Ljóðvolli**:
Sum liður í samráðingunum við Jákup Sverra Joensen, inniheldur útbjóðingartilfarið eina 0,6 m høga grótlaðing og ein ljóðvolla fram við ognini hjá Sverra Joensen, matr. nr. 1337, Tórshavn.

**Fyribilsvegur, meðan arbeðið verður gjørt:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til fyribilsveg rundan um arbeiðsøkið, meðan arbeiðið fer fram. Víst verður til tekning, sí TK j. nr. 2008-1243/1. Fyribilsvegurin er við í útbjóðingartilfarinum.

**Tíðarætlan:**
Byggitíðin er sett til níggju mánaðir.

**Útvegan av lendi:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við eigaran av matr. nr. 1337, Tórshavn, Jákup Sverra Joensen. Ein busslummi verður gjørdur inni á ognini hjá Jákup Sverra Joensen á Eystara Ringvegi í niðara borði. Neyðugt er tí at kommunan ognar sær umleið 1500 m² frá Jákup Sverra Joensen.

Hvítanesvegurin verður rættaður upp í mun til verandi veg, og harvið verður nakað lendi at liggja millum matr. nr. 1337 og komandi Hvítanesveg. Hetta lendið

er umleið 1500 m² til stødar og svarar tískil til støddina á busslummanum. Umsigintin hevur gjørt avtalu við eigaran av matr. nr. 1337 um at gera eitt makaskifti lendinum viðvíkjandi.

Nú diameturin á rundkoyringini er broyttur frá 30 m til 37 m, er neyðugt, at kommunan ognar sær umleið 1107 m² til sjálva rundkoyringina. Afturat verður neyðugt at útvega umleið 1500 m² til ein busslumma í ovara borði á Eystara Ringvegi av ognini hjá Miðlon, matr. nr. 1333a, Tórshavn. Umsitingin hevur verið í samráðingum við Mads Winther vegna Miðlon. Samráðingarnar eru ikki lidnar og halda fram.

**Lisitatión:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgevanum HMP- Consult, fyrireikað eina innbodna útbjóðing, sí TK j. nr. 2008-3276, 2008-3278, 2008-3278 og 2008-3697. Í sambandi við innkomin tilboð verður víst til tey bjóðandi, TK j. nr. 2008-3698/1-4, lisitatiónsprotokoll, skjal nr. 5 og tilmæli frá ráðgeva, skjal nr. 6.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ráðgevin hevur gjørt eina kostnaðarmeting av verkætlanini, TK j. nr. 2008-3699/1. Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað óvæntaðar útreiðslur, ráðgeving, umsiting hjá Tórshavnar kommunu og 6,25% mvg, sí TK j. nr. 2008-3699/2. Kunnað verður á fundinum um hesa samlaðu upphædd.

Umsitingin kemur at greiða frá innkomnu tilboðunum frá lisitatiónini. Á íløguætlanini fyri 2008 eru markaðar kr. 4,3 mió. til verkætlanina.

**Ískoyti:**
Arbeiði varð boðið út til 6 arbeiðstakarar, og inn komu 3 tilboð. Lægsta tilboði var uppá kr. 14.011.393,00. Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað óvæntaðar útreiðslur, ráðgeving, umsiting hjá Tórshavnar kommunu og 6,25% mvg, sí TK j. nr. 2008-3699/2, og verður samlaði kostaðurin mettur til kr. 18.902.191,-.

Eftir lisitatiónina hevur umsitingin, biði ráðgeva gera plantekning (j. nr. 2008-3783/1 og 2) og eina meting av kostnaðinum við ljósregulering av ferðsluni á vegamótinum Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur. (j. nr. 2008-3797/3). Kostnaðurin verður mettur til kr. 5.183.000,-, íroknað prosjektering, óvæntaðar útreiðslur og 6,25% mvg. Í hesi upphædd er eisini írokna breiðkan av Hvítanesvegnum og Eystara Ringvegi fyri bíðirøðum. Busslummar eru ikki íroknaðir hesa meting.

Býráðið hevur í 2006 játtað kr. 540.000 til rundkoyring á Hvítanesvegnum. Av hesum eru kr. 374.000 tøkar. Býráðið hevur harumframt markað kr. 4.300.000 til rundkoyring á Hvítanesvegnum á íløguætlanini fyri 2008. Við støði í kostnaðarmetingini fyri eina loysn við ljósregulering, kann henda gerast við eini meirjáttan á kr. 509.000 afturat tøka peninginum frá 2006 og markaðu upphæddini fyri 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at lisitatiónin í sambandi við rundkoyringina verður ógildað, og at gjørt verður nýtt útbjóðingartilfar av loysnini við ljósregulering, og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión til somu tilboðsgevarar, ið góvu boð uppá rundkoyringina. Somuleiðis verður mælt til, at peningurin sum higartil er játtaður og markaður til loysnina við *rundkoyring*, verður fluttur til loysnina við *ljósregulering*.

**Tekniska nevnd 21. august 2008:** Vísandi til óvæntaða høga kostnaðin av rundkoyringini samtykti ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Halla Samuelsen, at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, halda fast um, at rundkoyring skal verða á vegamótinum og mæla til at nýtt og bíligari prosjekt verður gjørt, við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, samtykti at taka upp samráðingar við lægstbjóðandi um kostna fyri gerð av rundkoyring við einum diametri uppá 30 m, at leggja fyri teknisku- og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen, býráðslimur biður um hetta málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti.**
Umsitingin hevur sambært áheitan frá borgarstjóranum havt samráðingar við lægstbjóðandi um eina rundkoyring D= 30m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Umsitingin hevur fingið tilboð frá Andrias Berg Sp/f. áljóðandi kr. 10.128.046,54. Víst verður til TK. j. nr. 2008-3698/7.

Umsitingin hevur eisini gjørt eina samlaða kostnaðarmeting av tilboðnum íroknað óvæntaðar útreiðslur, ráðgeving, umsiting hjá Tórshavnar kommunu og 6,25% mvg, sí TK j. nr. 2008-3699/4. Harumframt er gjørt notat í sambandi við møguligar loysnir við shuntum saman við fyriliggjandi uppskoti um rundkoyring á D=30m. Víst verður til TK. j. nr. 2008-4391/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til tilmælið til nevndarfundin 21. august 2008.

**Tekniska nevnd 30. oktober 2008:** Ein meiriluti, Halla Samuelsen, Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen, samtykti at gera sáttmála við Sp/f Andreas Berg og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 14.363.529,- sambært skjali nr. 2008-3699/4.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at tikið verður av tilboðnum frá Sp/f Andreas Berg uppá gerð av eini rundkoyring, ið er 37 m í diametur sambært skjali nr. 2008-3699/2, vísandi til at øll tann tunga ferðslan av kajøkinum skal koyra um hesa rundkoyring.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til sína støðu í samtyktini hjá meirilutanum í teknisku nevnd 21. august 2008 og til sína støðu í samtyktini hjá meirilutanum í teknisku nevnd tann 29. november 2007 í máli nr. 2002-2014.

**Ískoyti:**
Jan Christiansen hevur biðið um hetta mál á skrá.

**Býráðið 27. november 2008:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Kathrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Halla Samuelsen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at beina málið í fíggjarnevndina, vísandi kommunustýrisskipanina §6 stk. 2, tí einki tilmæli er til málið í dag og §14 stk. 4 tí fíggjarnevndin ikki hevur haft málið til ummælis, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hanen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

At enda varð atkvøtt um tilmælið frá Jan Christiansen um at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd 30. oktober 2008, um at gera sáttmála við Sp/f Andreas Berg, um ger av rundkoyring D=30, og at játta kr. 14.363.529,- sambært skjali nr. 2008-3699/4 av konto 90, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Leivur Hansen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Kathrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Halla Samuelsen og Elin Lindenskov .

Leivur Hansen gjørdi vart við, at hann hevði biðið borgarstjóran og kommunustjóran um at fáa málið á fíggjarnevndarskránna 25. november 2009, men at hetta ikki varð gingið á møti.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Ásannandi at býráðið tann 27. november 2008 samtykti at taka undir við meiriltanum í teknisku nevnd 30. oktober 2008, um at gera sáttmála við Sp/f Andreas Berg, um ger av rundkoyring D=30, og at játta kr. 14.363.529,- sambært skjali nr. 2008-3699/4 av konto 90 uttan neyðuga nevndarviðgerð í fíggjarnevndini til ávísan av ítøkiligari fígging av konto 90 – konto fyri íløgur, mælir borgarstjórin til at avtaka býráðssamtyktina tann 27. november 2008.

Atkvøtt varð um tilmælið frá borgarstjóranum, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Anfinn Brekkstein

**FUNDUR LOKIN KL. 22:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Maria Súsanna Hammer Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Sjúrður Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |